2018

# Kanning av lesivanum hjá børnum 2017/18

FRÁGREIÐING

Sissal M. Rasmussen, Lydia Didriksen, Turið Kjølbro, og Marjun Ziskason

Heiti: Kanning av lesivanum hjá børnum 2017/18 - Frágreiðing

Kanningin er teldutøk og kann endurgevast við at vísa til: *Kanning av lesivanum hjá børnum 2017/18 – Frágreiðing,* Lydia Didriksen, Turið Kjølbro, Sissal M. Rasmussen og Marjun Ziskason, www.malmenning.fo, Tórshavn, 2018. Upphavsrættin eiga vit, ið hava tikið stig til kanningina, umframt Mentamálaráðið.

Skrivað frágreiðingina: Sissal M. Rasmussen saman við verkætlanarbólkinum, 2018

Stuðlað fíggjarliga: Mentamálaráðið, Føroya Lærarafelag, Starvsmannafelagið, Landsbókasavnið, Býarbókasavnið í Havn og Bókasavnið við Løkin. Annar stuðul: Nám, Bókadeild Føroya Lærarafelags og Føroyamálsdeildin.

Indhold


Lesikanningin 2017/18 ....... 3

Fororð ....... 3

Inngangur ....... 5

Hví er umráðandi at kanna lesivanarnar? ....... 5

Lesing og málførleiki ....... 5

Endamálið ....... 6

Alment um kanningina ....... 7

Luttakarar ....... 8

Spurningar ....... 8

Variablar ....... 8

Um teg ....... 9

Um teg og lesing í skúlanum ....... 28

Um teg og lesing í frítíðini ....... 37

Samandráttur av spurningum ....... 73

Hvussu ofta og hvussu nógv lesa børn? ....... 73

Hvat lesa tey? ....... 73

Á hvørjum máli lesa tey? ....... 73

Á hvørjum miðli lesa tey? ....... 74

Kyn ....... 74

Tíð ....... 74

Mál ....... 75

Tey vaksnu – lærarin og foreldrini ....... 75

Víðari greining ....... 75

Samanumtøka av víðari greining ....... 96

Høvuðsúrslit í kanningini ....... 97

Hjáveiða ....... 98

Samanumtøka og tilráðing ....... 99

Leinkjur ....... 101

Fylgiskjal ....... 102

Spurnablaðið ....... 102

# Lesikanningin 2017/18

## Fororð

Børn nú at døgum lesa minni samanborið við fyri nøkrum árum síðan; tað er eitt uppáhald, vit ofta hoyra, og skúlafólk hava í áravís varskógvað, at málførleikin hjá børnum og ungum í skúlaskipanini er viknandi. Vit hoyra nógvar pástandir í tí almenna rúminum um lesivanar hjá børnum og ungum; lesivanarnir hjá børnum í Føroyum eru ikki kannaðir, síðan Solveig Debess, master í barnabókmentum, lærari, skúlabókavørður og ritstjóri, gjørdi eina kanning 2006. Fyri at siga okkum um støðan er so vánalig, sum fleiri siga, at hon er, hava vit manglað eina nýggja, skipaða kanning, sum í tølum kann vísa okkum, hvussu støðan er nú og her. Slíkar kanningar eru vanligar aðrastaðni, og stórur tørvur er á at fáa nágreiniliga vitan um lesivanar í skúlahøpi og uttan fyri skúlan ígjøgnum serstaka verkætlan, so at uppáhald kunnu afturvísast ella munagóð átøk setast í verk. Meiri vitan gevur eitt betri grundarlag at taka umhugsaðar avgerðir.

Um árskiftið 2017/18 eru næmingar í 4., 6. og 9. flokki í øllum landinum spurdir eitt nú, hvussu nógv teir lesa, hvat teir lesa, hvussu ofta teir lesa, á hvørjum máli teir lesa, og hvørjum miðli teir lesa. Kanningin er sostatt ein støðulýsing av lesivanunum hjá skúlabørnum anno 2017/2018. Næmingar í 19 skúlum kring alt landið hava tikið lut í kanningini; skúlarnir eru dulnevndir og tilvildarliga valdir; tó hava vit tilvitað valt, at bæði stórir og smærri skúlar taka lut. Samanlagt hava um 1300 næmingar svarað. Tað er so heppið, at samstundis er ein líknandi kanning gjørd av lesi- og miðlavanunum hjá donskum børnum; tí hevur borið til at kunnað gjørt áhugaverdar samanberingar millum okkara kanning og ta donsku kanningina.

Vit, ið hava tikið stig til og staðið fyri kanningini, eru ein verkætlanarbólkur við Lydiu Didriksen, Marjun Ziskason, Turið Kjølbro og Sissal M. Rasmussen; Lydia Didriksen er námslektari á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum; hon er eisini fólkaskúlalærari, skúlabókavørður og MA umframt BA í føroyskum; Marjun Ziskason er ritstjóri á Námi og hevur somuleiðis drúgvar royndir sum fólkaskúlalærari, Turið Kjølbro er ritstjóri á Bókadeild Føroya Lærarafelags og cand.phil í norðurlendskum og bókmentum, og Sissal M. Rasmussen er exam.art. í føroyskum, cand.mag í audiologopedi umframt Ph.D.-lesandi á Føroyamálsdeildini. Vit hava allar brennandi áhuga fyri lesing og starvast innan økið dagliga.

Tað eru umleið 3 ár síðan, at vit fingu hugskotið til kanniningina eftir eitt undirvísingarskeið í málmenning á Føroyamálsdeildini; vit fóru undir at fyrireika kanningina av lesivanunum, at søkja um pengar at fíggja hana og síðan nágreiniliga at leggja hana til rættis. Tvær ferðir hava umboð fyri verkætlanarbólkin verið á Lesisentrinum í Stavanger í Noregi og tosað við granskarar har um kanning av lesivanum, lesiátøk og annað í hesum sambandi. Umframt hevur Sissal M. Rasmussen, sum er í ferð við Ph.-D.-ritgerð av málinum hjá 0-36 mánaðar gomlum børnum, fingið í lag samstarv við tey, ið hava staðið fyri stóru kanningini av lesivanunum hjá donskum børnum. Nakrir

av spurningunum í føroysku og donsku kanningini eru teir somu, soleiðis at tað ber til at samanbera úrslit.

Mentamálaráðið hevur fíggjað høvuðspartin av lesikanningini; av tí at vit valdu at víðka kanningina, soleiðis at hon kundi fáa størri virði, søktu vit eisini onnur um fíggjarligan stuðul; tey eru Føroya Lærarafelag, Starvsmannafelagið, Landsbókasavnið, Býarbókasavnið í Havn og Bókasavnið við Løkin; harumframt hava Nám og Bókadeild Føroya Lærarafelags stuðlað arbeiðinum; vit takka hjartaliga fyri allan stuðul, vit hava fingið og øllum, sum hava virkað við til, at hendan kanning nú er komin í hús, serliga nevndu stuðlum, skúlastjórum og øllum lærarum, sum vóru so beinasamir at hjálpa til í innsavningini av dátuni. Somuleiðis takka vit skúlastjóra, lærarum og næmingum í skúlanum, sum var við í undankanningini.

Greiningarfyritøkan *Lóður* hevur staðið fyri at savna dátuna inn og greina úrslitini. Frágreiðingina burtur úr úrslitunum hevur Sissal M. Rasmussen gjørt saman við verkætlanarbólkinum, ið hevur staðið fyri lesikanningini.

Nú eru úrslitini loksins almenn, og nýggj vitan er løgd afturat. Í kanningini hava vit roynt at seta spurningarnar soleiðis, at vit fáa svar upp á nakrar ítøkiligar spurningar, men eisini soleiðis at vit fáa vitan til vega, sum kann peika okkum frameftir mótvegis møguleikum fyri átøkum, sum kunnu vera við til at betra og víðka møguleikar og hug hjá børnum at lesa. Vit síggja kanningina sum eitt amboð í menningini av lesiførleikanum og lesihuginum hjá børnum – sum er ein hornasteinur í læring, mentan og menning. Her eru nógv úrslit, sum eru áhugaverd fyri foreldur, skúlar, skúlaleiðslur, lærarar, skúlastýri, myndugleikar, politikarar, útbúgvingarstovnar, bókasøvn og forløg. Vit, ið hava tikið stig til og staðið fyri kanningini, vóna, at eitt uppbyggjandi kjak, bæði fakligt og millum myndugleikar, fer at spyrjast burtur úr mongu sera áhugaverdu úrslitunum í kanningini, soleiðis at vit øll í felag kunnu arbeiða víðari við átøkum, sum styrkja lesiførleikar og lesihug hjá okkara børnum.

# Inngangur

## Hví er umráðandi at kanna lesivanarnar?

Lesing og lesiførleiki eru ein grundleggjandi førleiki, tá ið tú skalt nema tær lærdóm og vitan. Í staðin fyri at halda lív í uppáhaldunum um, hvussu nógv ella lítið børn lesa og gita, so vilja vit vita, hvussu støðan er. PISA-kanningarnar hava víst, at ein ov stórur partur av okkara børnum dugir ov illa at lesa, hóast lesing er eitt amboð og vegurin inn í flestu lærugreinar í skúlanum. Lesing er grundarlagið, sama um tú velur at fara í miðnám ella ikki, sama um tú velur eina bókliga útbúgving ella ikki, tí lesing er ein av fortreytunum fyri at vera virkin í samfelagnum.

Harumframt er lesing vegurin inn í bæði yrkisbókmentir og fagurbókmentir, sum geva okkum sum menniskju eina rúgvu av vitan og upplivingum. Lesing er, fyri tey sum eru lesarar, ein ótømandi kelda til gleði, spenning og undirhald. Gjøgnum bøkur kann barnið lesa um ymiskar kenslur og tankar, fólk hava, og um støður, sum ymisk fólk koma í. Hetta er gevandi og læruríkt, og tað ger, at barnið lættligari kann kenna seg sjálvt aftur og læra onnur at kenna. Barnið víðkar sjónarringin, fær vitan um verðina og lærir nýggj hugtøk, ið er neyðug undanvitan fyri lesifatan, lærir at hugsavna seg, og ikki minst lærir barnið um at vera menniskja.

Gerandisdagurin hjá børnum er nógv broyttur seinastu árini, og talgilda verðin bjóðar børnum undirhald og upplivingar upp í rúgvur. Aðrastaðni sæst, at hetta hevur ávirkað lesivanarnar hjá børnum, serliga í frítíðini. Tað er tó soleiðis, at skal barnið gerast ein góður lesari, er venjing neyðug - tað at lesa nógv og ymiskt tilfar á tí støði, har barnið er. Tað er ikki vist, at hóast barnið dugir at lesa, tað vil siga dugir teknisku lesiførleikarnar, at tað gerst *lesari*. Fyri at venja og lesa er eisini neyðugt við hóskandi tilfari og endamálið við útgávunum hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags og samstarvinum millum Bókadeildina og Nám um krabbabøkur er eitt nú, at børn hava nógv dygdargott tilfar á føroyskum at velja í, á ymiskum torleikastigi og eftir ymiskum áhugamálum.

### Lesing og málførleiki

Børn læra sítt ella síni móðurmál gjøgnum samskifti við onnur longu frá móðurlívi. Samskiftið, ið barnið hevur frá tað er føtt, er bæði nonverbalt og verbalt, og tað hevur stóran týdning, at barnið er í sosialum sambondum og stimbrast málsliga. Barnið mennist við at hoyra mál, bæði talu í samskiftinum við onnur og gjøgnum upplestur. Lesing, bæði upplestur og tá barnið sjálvt seinni dugir at lesa, hevur týdning, tí menningin av málførleikanum m.a. er kjølfestur í skriftmálinum. Ígjøgnum lesing koma børn og ung í samband við skriftmálið. Skriftmál er meira komplekst enn talumál og hevur ríkari orðfeingi; tá børn lesa ella hoyra skrivaðan tekst, kann hetta lyfta teirra egna málførleika á hægri støði – bæði í talu og skrift. Málførleikin hevur týdning fyri, hvussu tað einstaka barnið klárar seg víðari í lívinum og hevur sostatt alstóran týdning fyri samfelagið, tí málførleikin er ein av hornasteinunum í sosialum sambondum, útbúgving og luttøku í samfelagnum. Tað ber tískil til at bøta um málførleikan ígjøgnum lesing og eisini at betra lesiførleikarnar við at lesa nógv, og tí er tað týdningarmikið at fáa ítøkiliga vitan um lesivanar til vega, tað vil siga vitan um hvat, hvar og hvussu nógv børn lesa.

Hvat krevst fyri at hava góðan málførleika, og hvat forðar tí? Hevur tú ongantíð skrivaðan tekst fyri tær, mennir tú ikki málið á fullgóðan hátt; tað er ikki nóg mikið bara at hoyra onnur børn ella vaksin tosa, tú mást eisini lesa fyri at ogna tær góðan, ríkan og djúpan málførleika, t.d. orðfeingi. Orðfeingi eru orð, sum liggja í huganum, og sum verða tikin fram í minninum. Fyri at menna orðfeingið krevst, at børn hoyra og síggja orð aftur og aftur, og at torleikastigið í tekstunum, tey lesa, alla tíðina hækkar samsvarandi aldursstiginum og førleikastiginum hjá barninum. Barnið, sum lesur, hevur betri orðfeingi og lættari við at skilja tekst og orða seg, bæði í talu og á skrift.

Ein avleiðing av, at børn lesa lítið og einki, kann vera, at tey ongantíð koma á lagið at lesa flótandi og raðið, at tey rætt og slætt gerast vánaligir lesarar, og at tey lesa seint; lesur tú seint, ávirkar tað eisini hugin hjá tær at lesa. Í øllum lærugreinum er nógv at lesa. Eldri børnini gerast, truplari verður teksturin. Bæði setningsbygnaður, innihald og orð verða torførari, og meiri abstrakt orð koma fyri í øllum lærugreinum; lesur tú ikki, hevur tú ilt við at lesa truplari tekst, skilja orðini og kenna tey aftur. Skriftmálið er so samansett, at venjast børn ikki við skriftmálið, meðan tey eru smá, so menna tey ikki orðfeingið, og tey megna ikki at lesa abstraktan tekst. Hesi børnini, sum ikki lesa, renna seg ímóti nógvum forðingum, og tey dragna afturúr samanborið við tey, sum lesa.

Mangan verður Matteus-effektin tikin fram í málmenningarhøpi, og tað er ikki uttan orsøk; hon sipar til evangeliið eftir Matteus, kap. 25, ørindi 29, sum sigur: “Tí hvør tann, ið hevur, honum skal verða givið, og hann skal hava yvirflóð; men tann, ið ikki hevur, frá honum skal verða tikið eisini tað, ið hann hevur.” Júst soleiðis er við lesingini: tey, sum duga og lesa, fara at duga betur og læra meiri, og øvut, tey, sum ikki duga, læra ikki meiri. Hesi eru eisini í vanda fyri at steðga upp, geva skarvin yvir og koma ongantíð í gongd samanborið við lesaran, sum er í støðugari menning. Eisini er tað ávíst at orðfeingið hjá børnum heilt niður í hálvtannað ár kann fyriboða lesimenningina hjá børnum nógv ár seinni. Tað vil siga, at kennir barnið nógv orð, tá tað er lítið, so verður lesitilgongdin helst lættari; hinvegin kennir barnið fá orð, tá tað er lítið, eru størri sannlíkindi fyri at enda undir miðal í lesiførleika seinni í skúlatíðini.

## Endamálið

Endamálið við kanningini er at veita nýggja, dagførda vitan um lesing, hugburð til lesing og tilfar, og at fáa at vita, um okkara børn og ung lesa í nóg stóran mun, so gróðrarbotnur er fyri, at teirra mál og lesiførleiki mennist. Lesikanningin kann geva vitan og íkast til kjakið um lesivanar hjá børnum. Spurningarnir, vit seta, eru sprotnir úr vitan um, hvat hevur týdning fyri lesing, eisini soleiðis at svarini kunnu geva ábendingar um, hvørji tiltøk kunnu setast í verk. Harumframt hava vit hugt at kanningum, ið eru gjørdar í grannalondunum og t.d. Onglandi, umframt at vit hava lagað okkara spurningar til, soleiðis at okkara úrslit kunnu samanberast við nýggja kanning, ið er gjørd í Danmark um somu viðurskifti.

Nakrir av høvuðspurningunum, vit settu okkum fyri at fáa svaraðar, vóru hesir:

- Hvussu ofta og hvussu nógv lesa børn?
- Hvat lesa tey?
- Á hvørjum máli lesa tey?
- Á hvørjum miðli lesa tey?

Háttalagið er ein kvantitativ spurnakanning, har næmingarnir skuldu krossa av á einum pappírsspurnablaði. Tá tað eru børn, sum eru við í kanningini, krevst, at serlig atlit verða tikin til, hvussu spurningarnir eru settir, hvussu teir kunnu skiljast av børnunum, og at teir eru á hóskandi støði við atliti at lesiførleika. Alt hetta hava vit lagt stóra orku í at arbeiða við, og vit hava roynt spurnablaðið áðrenn á øllum floksstigum og gjørt samrøðu aftaná við næmingar og gjørt tillagingar sambært hesum.

Við kanningini ber til at taka støðu til, um átøk skulu gerast, og síðan kann farast undir at kanna, hvørji tey so skulu vera.

## Alment um kanningina

*Lóður* hevur staðið fyri at savna dáturnar og greina úrslitið. Dátueftirlitið hevur givið loyvi til kanningina, og øll, sum taka lut í kanningini, eru dulnevnd. Kanningin bleiv gjørd í tíðarbilinum seint á heysti 2017 til beint eftir ársskiftið 2018; undankanningin varð gjørd í september mánaði. Spurnablaðið var í pappírsformi og bleiv skannað inn fyri at gera tað talgilt. Úrslitini eru almenn í hesi frágreiðing og á heimasíðuni www.malmenning.fo.

4., 6. og 9. flokkur eru valdir út av ymiskum orsøkum. Stórt arbeiði hevur seinastu árini verið gjørt fyri at styrkja lesing og bøta um lesitilfar, serliga í yngru flokkunum. 4. og 6. flokkur eru við í Landsroyndini, meðan 9. flokkur er við í PISA-kanningini. Danska kanningin hevði eisini 4. og 6. flokk við, og tí kunnu føroysku úrslitini samanberast við hesa kanning í hesum flokkum, meðan 9. flokkur ikki var við í donsku kanningini; vit vildu hava vitan um lesivanar í tí árinum, børn fara úr fólkaskúlanum eisini. Eisini er PIRLS, sum er ein altjóða kanning av lesiførleikum, gjørd millum børn í 4. flokki, so um møguleiki verður til hetta seinni, eru somu flokkar kannaðir. Vit hava eisini sett føroysku børnunum nakrar av somu spurningum, sum eru í hesum og øðrum útlendskum kanningum.

Frágreiðingin er ein almannakunngerð av úrslitunum og er tøk talgild á internetinum. Í frágreiðingini er ein innleiðsla fyri at seta kanningina inn í ein samanhang, síðan eru úrslitini fyri hvønn einstakan spurning, ein víðari greining av úrslitunum, og at enda er ein samandráttur gjørdur í punktum við nøkrum av høvuðsúrslitunum. Um fíggjarlig orka var tøk, so kundu aðrar og víðari greiningar og frágreiðingar verið gjørdar við hesum stóra dátutilfarinum. Ein kvantitativ kanning sum hendan er í høvuðsheitinum tøl og hagfrøði, sum geva eina mynd av, hvussu støðan er í løtuni. Fyri at fáa góða umboðan eru 19 skúlar valdir út, sum umboða ymisk øki í landinum og ymiska skúlastødd. Av tí at støddin á stakroyndini í kanningini er stór, eru flestu munir í kanningini hagfrøðiliga ikki tilvildarligir. Hesir munir siga tó ikki nakað um orsøk, og tí mugu úrslitini setast

inn og tulkast út frá samtekstinum. Í hesi frágreiðingini eru flestu frágreiðingarnar av úrslitunum deskriptivar, tí slíkt tilfar krevur gjølla viðgerð.

Í frágreiðingini er lesing skilt sum eitt breitt hugtak, sum er at lesa í bæði bókum og á øðrum miðlum. Tað er tó ikki lætt at vita, hvat børn skilja við ávís hugtøk og spurningar, og tí eru óvissur í úrslitunum, hóast vit hava arbeitt við at tillaga spurningar og roynt tilfarið í eini undankanning.

### Luttakarar

Við í kanningini vóru 4. flokkar, 6. flokkar og 9. flokkar á tilsamans 19 skúlum við 1512 næmingum; tað er um 75 prosent av næmingunum í 4., 6. og 9. flokki í øllum landinum; av spurdu næmingunum svaraðu 1277 spurnablaðnum, tað eru 84 %. Hesir 19 skúlarnir umboðaðu øll øki í landinum og bæði stórar og minni skúlar. Kynsbýtið var 49 % gentur og 51 % dreingir.

**TALVA 1 Næmingar býtt á flokkar**

| Flokkar | Næmingar í alt | Næmingar luttikið í kanningini | Svarprosent |
|---|---|---|---|
| 4.fl. | 464 | 329 | 71% |
| 6.fl. | 528 | 465 | 88% |
| 9.fl. | 520 | 483 | 93% |
| **Í alt** | **1512** | **1277** | **84%** |

## Spurningar

Spurningarnir eru 26 í tali og býttir í tríggjar partar í sjálvum spurnablaðnum; ein partur eitur *Um teg*, ein partur eitur *Um teg og lesing í skúlanum,* og ein partur eitur *Um teg og lesing í frítíðini*. Í summum spurningum er ein svarmøguleiki; í øðrum ber til at seta fleiri krossar. Í hesi frágreiðingini eru spurningarnir gjøgnumgingnir í somu raðfylgju, sum teir eru í spurnablaðnum. Í hesum partinum verða sjálvir spurningarnir og svarini gjøgnumgingin við nakað av teksti til hvørja einstaka talvu ella mynd.

### Variablar

Greiningar eru gjørdar fyri hvønn einstakan spurning í mun til úrslitini fyri kyn, flokk og í mun til bólkarnar av børnum, sum lesa ávikavist lítið og nógv. Í seinasta partinum eru greiningar gjørdar í mun til heilar skúlaflokkar, har eyðkenni eru tikin fram fyri ávikavist teir 10 flokkarnir, sum liggja niðast í mun til lesitíttleika og hugburð, og teir 10 flokkarnar, sum liggja ovast.

## Um teg

## Spurningur 1: ERT TÚ GENTA ELLA DRONGUR?

Í fyrsta spurningi skuldu børnini svara um tey eru genta ella drongur, og svarini vístu, at tað er javnvág millum kynini í kanningini.

## Spurningur 2: HVØRJI MÁL TOSA TIT HEIMA HJÁ TYKKUM?




84 % av børnunum siga seg tosa føroyskt heima; 15 % tosa føroyskt og onnur mál, og 1 % tosa mest onnur mál heima.

## Spurningur 3: HVUSSU NÓGVAR BØKUR EIGA TIT HEIMA?




Svarmøguleikarnir eru 6, har ið møguleikin við minst bókum er *ongar* ella *fáar bøkur*, (færri enn 10) og upp til *nógvar bøkur*, ið eru fleiri enn 200; harumframt er svarmøguleikin *eg veit ikki*. Nærum ein triðingur svarar *eg veit ikki* til henda spurningin, og annars svara flest børn, at tey eiga 26-100 bøkur heima. Hetta er ein spurningur, sum ikki er lættur hjá børnunum at meta um, men hetta er fyri at fáa eina hóming av, um tað verður lisið heima, og um bøkur eru atkomuligar. Harumframt vísa útlendsk úrslit ein samanhang millum at eiga bøkur og lesiførleikan hjá børnum.




Um hugt verður at teimum, sum eiga 26-100 bøkur, sæst, at í 4. flokki siga 41 %, at tey eiga 26-100 bøkur, og í 9. flokki er talið 66 %. Tað eru eisini flest børn, sum eru í hesum bólkinum, 29 % av børnunum svara henda svarmøguleikan. Verða hesi tølini løgd saman og borin saman við, hvussu ofta børnini lesa í frítíðini (ikki skúlating) sæst týðiligur samanhangur millum, at tey, sum eiga bøkur heima, lesa eisini heima fleiri ferðir um vikuna í frítíðini.

## Spurningur 4: HVUSSU OFTA GERT TÚ HETTA Í FRÍTÍÐINI?




Børnini eru spurd um teirra frítíðarítriv, og hvussu ofta tey íðka hesi. Í hesum sæst ógvuliga týðiliga, at ítróttur er best umtókta ítriv millum børn og ung í Føroyum, og at tey eru saman við vinum fleiri ferðir um vikuna.




Tað er lítil munur millum kynini, tá ið umræður ítrótt, og tað at vera saman við vinfólkum. Gentur eru nakað raskari at spæla tónleik og onnur frítíðarítriv. Tað sæst eisini, at títtleikin fyri øll ítrivini fellur nakað, jú eldri børnini verða. Um hugt verður at frítíðarítrivunum og huginum at lesa, so sæst, at tey, sum ganga til tónleik, og tey, sum ganga til onnur ítriv, siga seg lesa munandi meiri enn tey, sum ikki ganga til hesi ítriv. Hinvegin sæst, at tað at ganga til ítrótt onga ávirkan hevur á lesitíttleikan, og heldur ikki, um tey eru nógv ella lítið saman við vinum; hetta eru eisini tey ítrivini, sum flest børn siga seg gera. Tað vil siga, at her sæst, at tey, sum lesa nógv, eru líka nógv saman við vinum, sum tey, sum ikki lesa ella øvut.

## Spurningur 5: HVUSSU SAMD/UR ER TÚ VIÐ HESUM ÚTSAGNUM




Í hesum spurningi sæst, at nógv tann størsti parturin av næmingunum dámar væl at ganga í skúla, at tey trívast í skúlanum, og at tey halda, at tey læra nakað í skúlanum. Bara 5 % halda ikki, at lærararnir eru fittir við seg.




Um hugt verður at hesum somu spurningunum og bara tey, sum siga seg vera *samd* ella *púra samd* í útsøgnunum verða tikin úr, sæst, at nógv fleiri gentur, 75 %, enn dreingir, 55 %, siga seg dáma væl at ganga í skúla. Eisini sæst, at 92 % av gentunum halda, at lærararnir eru fittir móti sær, meðan talið hjá dreingjunum er bara 78 %. Útsøgnin *eg havi nógvar vinir í skúlanum* er jøvn uttan mun til flokk, kyn og lesitíttleika.

Tá ið hugt verður at flokkunum í mun til útsagnirnar, sæst, at jú eldri næmingarnir gerast, jú verri dámar teimum at ganga í skúla. Eisini sæst, at tey í 9. flokki halda seg ikki fáa líka nógv burturúr, sum tey, sum ganga í 4. og 6. flokki; talið fellur úr 86 % niður í 72 %.

Verða hesir spurningarnir settir í samband við, hvussu ofta børnini lesa í frítíðini, sæst týðiliga, at tey, sum siga seg hava góðan hug at ganga í skúla, eisini eru tey, sum lesa mest í frítíðini; prosenttølini eru ávikavist 74 % og 59 %. Eisini sæst, at tey, sum halda seg fáa minni úr skúlagongdini, eisini eru tey, sum siga seg ikki lesa ella lesa sjáldan. Um hugt verður at teimum, sum halda, at lærararnir eru fittir móti sær og hugin at lesa, sæst, at tey, sum lesa lítið ella einki, eisini eru tey, sum halda, at lærarin ikki er so fittur móti sær; munurin er kortini ikki so stórur frá 89 % niður í 82 %.

## 6. spurningur: HVUSSU OFTA GERT TÚ SKÚLATING?




Her sæst, at næstan 80 % av næmingunum siga seg altíð ella næstan altíð gera skúlating. 18 % siga seg gera skúlating av og á ella sjáldan. Bara 1 % sigur seg ongantíð gera skúlating.




Um tað bara verður hugt at teimum, sum siga seg altíð gera skúlating, sæst, at 38 % av gentunum gera altíð skúlating, meðan talið hjá dreingjunum er 31 %. Fyri flokkarnar sæst, at tað talið er støðugt í 4. og 6. Flokki, 43%, meðan tað fellur til 19 % í 9. flokki. Um hesi somu tølini verða samanborin við tølini fyri tey, sum siga seg lesa í frítíðini, og tey, sum ikki lesa, so sæst, at tey, sum lesa í frítíðini, eisini gera oftari skúlating, 47 %, móti 29 % hjá teimum, sum ikki lesa í frítíðini.

## 7. spurningur: HVØR HJÁLPIR TÆR VIÐ SKÚLATINGUM?




Her sæst, at hjá teimum flestu eru tað foreldrini, sum hjálpa við skúlatingum, meðan ein fjórðingur sigur, at eingin hjálpir teimum. Hugsast kann, at í bólkinum, sum onga hjálp fáa, eru bæði børn, sum hava tørv á hjálp, umframt tey, sum megna tað sjálv og ikki hava tørv á hjálp. Í hesum spurninginum kundu tey luttakandi seta fleiri enn ein kross.




Sum heild sæst, at mammurnar gera oftast skúlating við børnunum, men flestu børnini fáa eisini hjálp frá pápunum. Tað sæst eisini, at talið av teimum, sum onga hjálp fáa, veksur úr 15 % í 4. flokki upp í 37 % í 9. flokki. Felags fyri allar spurningarnar er, at mamman verður oftast nevnd, sum tann, ið ger skúlating við børnunum; serliga væl sæst hetta, tá ið tað verður samanborið við, hvussu ofta børnini lesa; har sæst, at tey, sum fáa hjálp til skúlatingini frá mammuni, eru tey, sum lesa oftari í frítíðini. Hyggja vit at kynunum, sæst, at færri dreingir enn gentur fáa hjálp til skúlating.

## 8. spurningur: HVUSSU NÓGVA TÍÐ BRÚKAR TÚ TIL HETTA EIN VANLIGAN DAG?




Svarmøguleikarnir eru, at tey kundu seta kross við *onga tíð, upp til 1 tíma, 1-3 tímar, 4-5 tímar, meiri enn 5 tímar* ella *veit ikki*. Her sæst, at tað, sum vit ofta hava kallað vanligu miðlarnir, standa veikt, nógv siga seg ongantíð hvørki hyggja í sjónvarp ella lesa bløð og bøkur. Umleið 40 % siga seg lesa bæði bløð og bøkur í meiri enn ein tíma um dagin. Hinvegin eru 35 %, sum ongantíð lesa bløð og bøkur. Støðan er ikki heilt hin sama við sjónvarpinum; har siga 60 % seg hyggja upp til ein tíma ella meiri, men 26 % siga seg ongantíð hyggja.

Tá ið tað kemur til talgild tól og nýtsluna av teimum, so siga 42 % seg brúka telefon, teldil ella teldu meiri enn 4 tímar um dagin; um tey, sum brúka hesi tól meiri enn ein tíma, verða tald við, so er talið 73 %.

Børnini hyggja nógv at filmum á Netflix, youtube og øðrum; fleiri enn 90 % siga seg hyggja upp til ein tíma ella longri hvønn dag. Hinvegin verður ikki nógv lisið á hesum somu tólum, bara knappliga 10 % siga seg lesa bloggar, greinar og annað á telduni í meiri enn ein tíma um dagin. 10 % lesa bøkur og bløð longri enn ein tíma um dagin.




Um hugt verður at teimum, sum hava svarað, at tey brúka meiri enn ein tíma um dagin, og hetta verður samanborið við aðrar spurningar, sæst t.d., at dreingir spæla nógv meiri telduspæl enn gentur. 67 % av dreingjunum spæla meiri enn ein tíma, meðan bara 25 % av gentunum gera tað sama. Dreingir hyggja eisini meiri í sjónvarp enn gentur, ávikavist 30 % fyri dreingir og 20 % fyri gentur. Hinvegin brúka genturnar sosialu miðlarnar meiri, 52 % siga, at tær brúka sosialar miðlar meiri enn ein tíma hvønn dag, hjá dreingjunum er talið 32 %. Tá ið hugt verður at hesum somu tølum, og tey verða sett í samband við flokkarnar, sæst, at øll tølini vaksa jú eldri tey gerast, t.d. fyri nýtslu av teldu, telefonum og teldlum, brúk av sosialum miðlum og øðrum. Einastu tølini, sum minka, eru tey fyri um tey lesa bøkur og hyggja í sjónvarp. Tey í 9. flokki lesa minni og hyggja minni í sjónvarp enn hinir árgangirnar. Tá ið borið verður saman við tølini fyri tey, sum siga seg lesa hvønn dag, og tey, sum ikki lesa, so sæst týðiliga, at tey, sum ikki lesa, nýta talgildu miðlarnar nógv meiri enn tey, sum lesa.

## 8. HVUSSU NÓGVA TÍÐ BRÚKAR TÚ TIL HETTA EIN VANLIGAN DAG? – meir enn 1 tíma *Samanbering við donsku úrslitini*















Í talvunum omanfyri sæst ein samanbering av úrslitunum í donsku og føroysku kanningunum fyri hvussu nógva tíð børnini brúka til ymiskt ein vanligan dag. Føroysk børn lesa færri søgur og tekstir á internetinum enn donsk børn. Viðvíkjandi hinum spurningunum sæst, at føroysk børn eru samanbærilig, men brúka sum heild eitt sindur minni tíð upp á ymsu tingini, í teimum flokkunum, sum kunnu samanberast – 4. og 6. flokkur.

## 9. spurningur: ERT TÚ LIMUR Í BARNABÓKAKLUBBANUM?




Her sæst, at nógv av skúlabørnunum kenna ikki Barnabókaklubban, tá tey eru spurd, og nógv eru ikki limir. 10 % av børnunum siga seg vera limir, og 14 %, at tey hava verið.




Her sæst, at millum tey, sum lesa nógv, eisini eru fleiri, sum annaðhvørt hava verið limir ella eru limir í Barnabókaklubbanum, í mun til tey, sum lesa sjáldan ella ongantíð. Tað eru eisini nógv fleiri, sum ikki kenna til Barnabókaklubban millum tey, sum ikki lesa í frítíðini.

## 10. spurningur: Hvussu ofta? Spurningur snýr seg um enskt í føroyska málinum




Her verða børnini spurd, hvussu ofta tey brúka ensk orð í ymsum støðum. 30 % siga, at tey *ofta* ella *sera ofta* brúka ensk orð, tá ið tey eru saman við vinfólkunum. 27 % siga seg *ofta* ella *sera ofta* brúka ensk orð, tá ið tey spæla teldu ella líknandi. 13 % siga, at tey tosa enskt, tá ið tey eru saman við vinfólkum, og um tey, sum siga, at tey gera tað *av og á*, verða tikin við, er talið 34 %. 28 % brúka *ofta* ella *sera ofta* ensk orð, tá ið tey mangla ella ikki kenna føroyska orðið.




Um hugt verður at teimum, sum siga seg brúka ensk orð *ofta* ella *sera ofta*, sæst, at dreingir sum heild brúka fleiri ensk orð; einasta undantakið er, tá ið børnini eru saman við vinfólki, tá siga bæði gentur og dreingir seg brúka enskt líka nógv. Serliga er tað, tá ið dreingir spæla teldu, at teir brúka ensku orðini; hetta talið samsvarar eisini við, at dreingir siga seg spæla munandi meiri teldu enn gentur. Tá ið ensku orðini verða sett saman við flokkunum, sæst ein líðandi øking úr 4. flokki upp til 9. flokk. Tey í 9. flokki siga seg munandi oftari brúka enskt, tí tey ikki duga føroyska orðið í mun til hinar flokkarnar; talið er 45 % í mun til 22 % í 4. flokki. Eisini siga tey seg brúka nógv meiri enskt enn hinir flokkarnir, tá ið tey eru saman við vinfólki; har er talið 47 % móti 22 % í 4. flokki. Um hugt verður at ensku málnýtsluni og lesing, sæst, at tey børnini, sum lesa nógv, ikki brúka ensku orðini líka nógv, sum tey, sum ikki lesa. Av teimum, sum lesa nógv, siga 19 % seg brúka ensk orð, tá ið tey ikki kenna føroyska orðið, meðan talið á teimum, sum ikki lesa, er 32 %. Tey, sum ikki lesa, tosa eisini meiri enskt, tá ið tey eru saman við vinfólkum sínum; 13 % móti 9 % á teimum, sum lesa nógv.

## Spurningur 11: HVUSSU OFTA GERA TIT HETTA Í SKÚLANUM?




Her verður spurt um lesivanar í sjálvum skúlanum, um hvussu ofta tey lesa hart, hava frílesing og um tey tosa um tað, sum lisið er. 55 % av næmingunum hava lesiløtu/frílesing minst eina ferð um vikuna. Á leið líka nógv lesa hart minst eina ferð um vikuna. Nakað færri – 48 % - lurta eftir søgu minst eina ferð um vikuna. 60 % av næmingunum tosa um tað, sum tey lesa, minst eina ferð um vikuna.




Tá ið hugt verður at hesum tølunum, og hvørjum flokkum tey ganga í, sæst, at tey í teimum yngru flokkunum oftari hava lesiløtu, í 4. flokki eru tey 81 %, meðan tey í 9. flokki bara eru 22 %. Hinvegin tosa tey í teimum eldru flokkunum meiri um tað, sum tey lesa, 77 % í 9. flokki, meðan tað bara eru 42 % í 4. flokki.

## Spurningur 12: HVUSSU OFTA LÆNIR TÚ BØKUR Á BÓKASAVNINUM (Í SKÚLANUM)?




Her sæst, at 65 % av næmingunum siga seg ongantíð ella næstan ongantíð læna bøkur á skúlabókasavninum. Bara 14 % siga seg læna fleiri ferðir um vikuna.




Tá ið hugt verður at teimum, sum siga seg læna bøkur fleiri ferðir um mánaðin ella oftari, so sæst, at gentur eru títtari gestir á bókasøvnunum. Tá ið hugt verður at flokkunum, sæst, at tey í fjórða og sætta læna nokkso nógv, meðan tey í 9. flokki læna nógv minni. Í teimum báðum yngru flokkunum liggur talið um 50 %, meðan tað í 9. er bara 9 %. Um bókasavnsvitjanirnar verða samanbornar við, hvussu ofta tey lesa, sæst – og tað er eisini væntandi – at tey, sum lesa nógv, eru títtari gestir á bókasøvnunum, munurin er 30 %.




Um føroysku tølini verða samanborin við donsku tølini, sæst, at føroysku næmingarnir brúka bókasøvnini nakað minni enn javnaldrarnir í Danmark.

## Spurningur 13: HVUSSU SAMD/UR ER TÚ VIÐ HESUM ÚTSAGNUM?




Her sæst, hvussu samdir næmingarnir eru í útsøgnum um, at tey halda seg duga at lesa og rokna.




Dreingir halda seg duga betur at rokna enn gentur halda seg duga at rokna; við lesingini er tað øvut, at fleiri gentur halda seg duga væl at lesa enn dreingir halda seg duga at lesa. Men munurin er lítil. Fleiri dreingir halda, at lesing er torførari lærugrein enn aðrar. Tá ið flokkarnir verða tiknir fram, so sæst, at broytingin í, hvussu væl næmingarnir halda seg duga at lesa ikki er stór. Tá ið talan er um rokning, eru færri í 9. flokki, sum halda seg duga væl at rokna. Hinvegin eru færri, sum í 9. flokki halda, at lesing er torførari lærugrein enn aðrar. Um hesi tølini verða samanborin við tølini fyri tey, sum siga seg lesa nógv, og tey, sum einki lesa, sæst, at tey, sum lesa nógv, eisini nógv oftari siga seg duga væl at lesa og rokna. Munurin liggur um 15 prosentstig. Tað er á leið líka nógv av teimum, sum lesa nógv, og teimum sum ikki lesa, sum siga, at lesing er torførari lærugrein.

## Spurningur 14: DUGIR TÚ LÍKA VÆL AT LESA SUM HINI Í FLOKKINUM?




Tey allarflestu halda seg duga líka væl at lesa sum hini í flokkinum, meðan 15 % halda seg duga verri ella eitt sindur verri enn hini í flokkinum. 19 % halda seg duga betur at lesa enn hini í flokkinum.




Tá ið tey, sum siga seg duga betur, verða tikin fram, sæst, at eitt sindur fleiri dreingir enn gentur halda seg duga betur at lesa enn hini í flokkinum. Eisini sæst, at jú eldri næmingarnir verða, jú betur halda tey seg duga at lesa enn hini; tað er 16 % í fjórða flokki og 22 % í níggjunda flokki. Tá ið svarini verða samanborin við tey, sum lesa nógv, og við tey, sum ikki lesa, so sæst, at tey, sum siga seg lesa nógv, eisini í størri mun halda seg duga betur at lesa enn hini í flokkinum.

## Spurningur 15: HVUSSU OFTA LÆNIR TÚ BØKUR Á BÓKASAVNINUM AT HAVA HEIM VIÐ AT LESA?




Her sæst, at 80 % av næmingunum ongantíð ella sjáldan læna bøkur á bókasavninum heim við at lesa; 20 % gera hetta fleiri ferðir um mánaðin ella oftari.




Eisini sæst, at tey í 9. flokki læna munandi minni, 6 % í mun til 35 % í fjórða flokki. Eisini sæst øgiliga stórur munur á teimum, sum læna bøkur, um tað verður borið saman við lesihugin annars. Tey, sum siga lesa nógv, læna nógv meiri enn tey, sum ikki siga seg lesa í frítíðini; munurin er frá 48 % niður í 8%.




Tá ið tølini verða samanborin við Danmark, sæst, at í 4. flokki læna føroysk børn fleiri bøkur, men í 6. flokki eru tølini tey somu.

## SPURNINGUR 16: HVUSSU OFTA LESUR TÚ BØKUR Í FRÍTÍÐINI (IKKI SKÚLATING)?




Hesin spurningur verður brúktur til samanberingar við aðrar spurningar í hesari kanningini. Her sæst, at 64 % siga seg ongantíð ella sjáldan lesa bøkur í frítíðini, meðan 24 % siga seg lesa hvønn dag ella fleiri ferðir um vikuna. 12 % siga seg lesa bøkur fleiri ferðir um mánaðin.




Eisini sæst, at fleiri gentur enn dreingir lesa fleiri ferðir um vikuna, og at tað eru teir yngru flokkarnir, sum lesa meiri enn teir eldru.




Tá ið borið verður saman við Danmark, sæst, at føroyskir næmingar lesa munandi minni enn teir donsku næmingarnir, í summum førum ikki meiri enn eina góða helvt av tí, sum tey lesa í Danmark.




Samanbera vit tølini fyri Føroyar og Danmark í mun til, hvat gentur og dreingir lesa, so sæst, at í Føroyum er nógv størri kynsmunur.

## Spurningur 17: HVUSSU LEINGI LESUR TÚ ANNAÐ ENN BØKUR Í FRÍTÍÐINI? (ALT TELUR VIÐ, T.D. FACEBOOK, BLØÐ, HEIMASÍÐUR, MESSENGER, SMS)?




Her sæst, at 38 % siga seg lesa annað enn bøkur meiri enn ein hálvan tíma um dagin, og at bara 7 % siga seg ongantíð lesa.




Eisini sæst, at gentur lesa nakað meiri enn dreingir, 62 % samanborið við 53 %. Hinvegin veksur prosenttalið, jú eldri flokki næmingarnir ganga í. Úr 31 % í 4. flokki upp í 81 % í 9. flokki. Hinvegin er eingin munur á teimum, sum lesa nógv av øðrum enn bøkur í frítíðini, og teimum, sum ikki lesa.

## Spurningur 18: HVØRJI AV HESUM ERT TÚ SAMD/UR VIÐ, TÁ TÚ HUGSAR UM LESING?




Her kunnu fleiri krossar setast. 51 % svara, at teimum dámar at lesa. 11 % svara, at tey hata at lesa, 25 % halda tað er keðiligt at lesa, meðan 57 % siga seg læra nógv av at lesa, og 19 % halda tað vera kul at lesa. Hesir spurningar eru brúktir í greiningini av hugburðinum til lesing. 37 % siga seg lesa, tí lærarin sigur tað.




Tá ið jaligu partarnir av spurningunum verða settur saman við flokki, kyni og hugi at lesa, sæst millum annað, at gentur hava eini meiri jaligan hugburð til lesing, og at tær eisini oftari halda seg fáa nakað burtur úr lesingini. Tað sæst, at jú eldri børnini eru, jú minni dámar teimum at lesa, serliga sæst hetta væl í 9. flokki, har tølini yvir ein kamb eru lægri enn í hinum árgangunum. Um hugt verður at teimum, sum siga seg lesa í frítíðini, sæst eisini, at tey halda seg fáa nógv burturúr at lesa; 73 % av teimum, sum lesa nógv, halda seg læra nógv av at lesa, meðan talið á teimum, sum ongantíð lesa, er bara 49 %. Ikki óvæntað er stórur munur á, hvussu teimum dámar at lesa, 81 % móti 35 %, og at tey, sum dámar at lesa, eisini halda tað vera munandi kulari at lesa enn tey, sum ikki lesa nógv í frítíðini.




Tá ið neiligu partarnir av spurningunum verða settir saman við kyn, flokk og títtleika, sæst, at lærarin er tann, ið hevur stóra ávirkan á, um næmingurin lesur. Nærum javnt stóra ávirkan á bæði kynini. Triði hvør næmingur í 4. flokki og 6. flokki sigur seg lesa, tí lærarin sigur tað, meðan heili 42 % ella út ímóti annar hvør næmingur í 9. flokki nevnir lærarán sum orsøk til lesingina; einans 10 % nevna foreldrini, tó at tey hava ávirkan á lesingina hjá yngru næmingunum. Serstakliga stóra ávirkan hevur lærarin á lesingina hjá teimum, sum lesa sjáldan ella ongantíð. Í talvuni sæst, at tað eru fleiri dreingir, sum halda, at lesing er keðilig, og sum siga, at teir hata at lesa; 14 % hata at lesa, og 34 % í 9. flokki halda tað er keðiligt at lesa. Lærararávirkanin og hugburðurin hava stóra ávirkan í 9. flokki.

## Spurningur 19: Á hvørjum máli lesur tú í frítíðini




Flest børn svara, at tey lesa á føroyskum, so á enskum, donskum og so heilt fá á øðrum máli.




Dreingir lesa minni enn gentur á føroyskum, men lesa meiri á enskum enn genturnar; sama er, tá ið talan er um onnur mál. Genturnar lesa meiri á donskum enn dreingirnir. Tá ið ræður um flokkarnar, sæst, at tey í 9. flokki lesa nógv meiri á enskum enn hinir árgangirnar, meðan 'onnur' mál er í mestan mun tað sama á øllum árgangum. Tað at lesa á føroyskum minkar jú eldri næmingarnir gerast, og tað danska er umleið tað sama yvir allar árgangirnar.

Tey, sum siga seg lesa nógv í frítíðini, lesa eisini meiri á føroyskum og á donskum, men tey, sum siga seg lesa lítið ella einki, lesa oftari á enskum, enn tey, sum lesa nógv; tølini eru 57 % fyri tey, sum ikki lesa, og 50 % fyri tey, sum lesa.

## Spurningur 20: HVØR HJÁLPIR TÆR AT FINNA TÆR BØKUR TÚ LESUR Í FRÍTÍÐINI?




Her kunnu fleiri krossar setast. Nógv tey flestu finna bøkurnar sjálv; 60 % hava sett kross við tann møguleikan. Síðan eru tað lærarar (16 %), foreldur (19 %), vinir (15 %) og bókavørðir (9 %), sum eru tey, sum hjálpa næmingunum at finna bøkur. 32 % svara, at tey ongantið ella næstan ongantíð lesa bøkur í frítíðini. Foreldur, vinir og lærarin hjálpa sostatt á leið líka ofta barninum at finna bøkur at lesa í frítíðini.




Á hesi talvuni sæst, at lítil munur er á, hvussu gentur og dreingir finna sær bøkur. Størsti munurin er, at gentur í størri mun fáa íblástur frá vinfólkum, og so siga fleiri dreingir enn gentur, at teir ongantíð lesa.

**Spurningur 20 í mun til flokk:**




Tá ið somu tøl verða sett í samband við flokkarnar, sæst, at í 4. og 6. flokki finna tey oftari bøkurnar sjálv, men at eisini lærararnir og foreldrini eiga størri leiklut í 4. og 6. flokki heldur enn í 9. flokki. Eisini eru nógv fleiri (49 %) í 9. flokki, sum siga, at tey ongantíð lesa í mun til hinar árgangirnar. Í 9. flokki brúka tey eisini meiri netið at leita sær eftir bókum enn hinir árgangirnir gera.

## Spurningur 20 í mun til, hvussu ofta børnini lesa:




Tá ið svarini fyri, hvør hjálpir tær at finna bøkur, verða borin saman við svarini fyri, um børnini lesa nógv ella ikki lesa, sæst, at tey, sum lesa nógv, eisini finna bøkurnar sjálv, men at foreldrini eisini hava ávirkan; hinvegin sæst lítil munur á ávirkanini, sum lærarin hevur á, hvørjar bøkur tey lesa.

## Spurningur 21: EG HEVÐI LISIÐ MEIRI...?




Her kunnu fleiri krossar setast; tað sæst, at tey serliga siga, at tey høvdu lisið meiri, um bøkur vóru um evni, sum hava teirra áhuga; tað eru 60 %, sum hava sett kross við hendan møguleikan. 47 % siga, at um tey vistu onkra góða bók, so høvdu tey lisið meiri. 14 % høvdu lisið meiri, um tey dugdu betur at lesa, 13 % um onkur las hart fyri teimum, og 8 % um onkur í skúlanum ella heima hjálpti teimum at finna bøkur.

## Spurningur 21 í mun til kyn:




Tá ið hesi svar verða sett saman við kyninum, sæst, at genturnar eftirlýsa bøkur um evni, tær hava áhuga fyri, og bøkur, sum eru góðar; fleiri teirra siga eisini, at nøkur av børnunum, serliga gentur, høvdu lisið meira um tær høvdu tíð.

## Spurningur 21 í mun til flokk:




Viðvíkjandi býtinum út á flokkarnar sæst, at tað eru tey í 9. og 6. flokki, sum vilja hava bøkur um evni, ið hava teirra áhuga. Tey í 4. flokki høvdu lisið meiri, um tað vóru fleiri bøkur á føroyskum.

**Spurningur 21 í mun til, hvussu ofta børnini lesa:**




Um hugt verður at svarunum í mun til tey, sum siga seg lesa ella ikki lesa, sæst, at tey, sum lesa nógv, høvdu lisið meira, um tað vóru fleiri bøkur á føroyskum, um tað vóru fleiri bøkur um áhugaverd evni, og um tey høvdu betri tíð. Eisini høvdu tey, sum ikki siga seg lesa, lisið meira, um tey vistu um góðar bøkur, og um tað vóru fleiri bøkur, sum høvdu áhugaverd evni, og 16 % av teimum, sum ikki siga seg lesa, høvdu lisið meira, um tey dugdu betur at lesa.

## Spurningur 22: LAS NAKAR FYRI TÆR, ÁÐRENN TÚ BYRJAÐI AT GANGA Í SKÚLA (TVS. TÁ TÚ VART YNGRI ENN 7 ÁR?




Her svara 79 %, at onkur las fyri teimum hvønn dag ella fleiri ferðir um vikuna, meðan 3 % svara, at eingin las fyri teimum.

**Spurningur 22 í mun til, hvussu ofta børnini lesa:**




Um hesi somu svar verða borin saman við, hvussu ofta tey lesa í frítíðini, sæst, at 88 % av teimum, sum lesa, svara, at onkur las regluliga fyri teimum, meðan sama tal fyri tey, sum ikki lesa nú, er 76 %.

## Spurningur 23: HVUSSU OFTA LESA TÍNI FORELDUR BØKUR?




Her svara 64 %, at foreldrini lesa ofta ella av og á. 22 % siga, at foreldrini sjáldan ella ongantíð lesa bøkur.

**Spurningur 23 í mun til kyn, flokk og hvussu nógv børnini lesa:**




Fleiri gentur (68%) siga, at foreldrini hjá teimum lesa ofta ella av og á; hjá dreingjunum er tað talið 61%.

Fleiri næmingar í 9. flokki siga, at foreldrini lesa heima, í 9. flokki eru tey 68 %, og í 4. flokki er talið 60 %. Tá ið hesi tølini verða samanborin við tey, sum siga seg lesa nógv í frítíðini, og tey, sum ikki lesa, sæst, at hjá teimum, sum lesa nógv í frítíðini, lesa foreldrini eisini, 76 % svara, at foreldrini lesa heima. Hjá teimum, sum ikki lesa, er hetta talið 57 %.

## Spurningur 24: HVØRJAR BØKUR DÁMAR TÆR AT LESA?




Her kunnu fleiri krossar setast. Best umtóktu bøkurnar eru spenningssøgur, 52 %, bøkur um søgur frá veruleikanum, 45%, og stuttligar bøkur, 44%. Her sæst, at Krabbabøkurnar ikki eru nevndar so tíðum, men millum Krabbabøkurnar eru eisini spenningssøgur, fantasy og líknandi, og tí kann vera torført at svara hesum spurninginum.

## Spurningur 24 í mun til kyn:




Gentum samanborið við dreingjum dámar sum heild betur tey ymsu tekstasløgini; serliga er hetta bøkur um kærleika (38 % móti 7 %) og bøkur um vinalag (37 % móti 12 %). Gentum dámar eisini betur fantasybøkur, spenningsbøkur og krimibøkur. Dreingjum dámar betur faktabøkur (23 % hjá dreingjum og 16 % hjá gentum), og so hava teir munin við einum prosentstigi, tá ið umræður teknirøðir (19 og 18 %).

## Spurningur 24 í mun til flokk:




Teimum í 9. flokki dámar best bøkur um kærleika og søgur frá veruleikanum, meðan tey í 4. flokki serliga nevna stuttligar bøkur og ævintýr umframt myndabøkur og so serliga krabbabøkur, sum tey lesa nógv oftari enn hinir árgangirnir.

**Spurningur 24 í mun til, hvussu ofta børnini lesa:**




Sum heild dámar teimum, sum lesa nógvar bøkur, øll tekstasløgini betur enn tey, sum ikki siga seg lesa í frítíðini. Teimum, sum lesa sjáldan, dámar tó krimibøkur betur. Bøkur, har munurin er lítil millum bólkarnar, eru myndabøkur og bøkur um kærleika.

## Spurningur 25: TÁ IÐ TÚ LESUR, HVUSSU DÁMAR TÆR SO BEST AT LESA?




Her er eingin ivi; børnunum dámar nógv best at lesa á pappíri; tað svara 64 % ,og 14 % svara, at telefonin er besti miðilin.

**Spurningur 25 í mun til kyn, flokk og lesitíttleika:**




Gentum dámar betur enn dreingir at lesa á pappíri, 73 % móti 55 %. Hinvegin dámar dreingjum betur at lesa á teldu, 15 % móti bara 2 % hjá gentum. Um hesi svar verða sammett við flokkarnar, so er lítil broyting í, tó dámar teimum eldru betur at lesa í telefon móti teimum yngstu í 4. flokki. Tá ið sammett verður við tey, sum siga seg lesa í frítíðini, og tey, sum ikki lesa, so er serliga munur á teimum, sum dámar at lesa í frítíðini, at teimum dámar betur pappír sum miðil, 77 % og 57 %. Hinvegin dámar teimum, sum ikki lesa í frítíðini, betur at lesa á ymsum øðrum miðlum heldur enn pappíri, hóast munurin ikki er so stórur.

## Spurningur 26: HVAT LESUR TÚ Á NETINUM (Á TELEFON, TELDLI/TABLET ELLA TELDU)?




Her kunnu fleiri krossar setast. Tá børnini lesa á netinum, lesa tey serliga um kend fólk (45 %), um ítrótt (39 %) og undirtekstir á filmum (42 %). 12 % hava svarað, at tey lesa einki.

**Spurningur 26 í mun til kyn:**




Gentur lesa oftari um kend fólk, filmar, tónleik, djór og undirtekstir í filmum, meðan dreingir lesa fleiri ítróttatíðindi á netinum. Tað eru eisini fleiri dreingir, 14 %, sum siga, at teir ikki lesa, móti 9 % hjá gentunum.

## Spurningur 26 í mun til flokk:




Tað eru serliga tey í 9. flokki, sum brúka talgildu tólini at lesa við; títtleikin hjá teimum er nógv størri enn hjá hinum árgangunum. Hetta er galdandi fyri allar spurningarnar.

**Spurningur 26 í mun til, hvussu ofta børnini lesa:**




Tey, sum siga seg lesa nógv á netinum í frítíðini, lesa serliga um kend fólk, tónleik, film og djór, og tey lesa eisini oftari undirtekstin, samanborið við tey, sum ikki siga seg lesa nógv. Hinvegin so lesa tey, sum ikki lesa so nógv í frítíðini, fleiri heimasíður; tey lesa ítróttartíðindi og eisini tað, sum verður rópt annað.

## Samandráttur av spurningum

Henda kanningin er ein støðulýsing av lesivanunum hjá børnum í 4., 6. og 9. flokki. Hetta er ein stór kanning; knapt 1300 næmingar hava svarað; tað er um 75 prosent av næmingunum í hesum árgangum. Her er samandráttur av svarunum til spurningarnar.

### Hvussu ofta og hvussu nógv lesa børn?

Hjá teimum flestu stendur lesing ikki ovarlaga á skránni; tveir triðingar ella 65,6 % av øllum børnunum í teimum trimum árgangunum lesa sjáldan ella ongantíð í frítíðini; taka vit tann bólkin úr, sum sigur seg lesa fleiri ferðir um vikuna (24 %) og hyggja at býtinum á teir tríggjar flokkarnar, ið hava tikið lut, so lesa 33 % av næmingunum í 4. flokki í frítíðini fleiri ferðir um vikuna, 30 % av næmingunum í 6. flokki og 13 % av næmingunum í 9. flokki. 45 % av børnunum siga seg brúka tíð upp á at lesa tekstir í bókum og bløðum vanligar dagar, meðan 35 % siga seg ongantíð lesa bøkur og bløð. Tá spurt verður, um tey lesa søgur og tekstir á internetinum, so eru tølini 25 %, sum lesa, meðan 46 % onga tíð brúka til hetta. Tá spurt verður, hvussu ofta børnini hava lesiløtu/frílesing í skúlanum, sæst, at gott helvtin ger hetta eina til tvær ferðir um vikuna ella oftari. Hyggja vit at hesum í mun til flokkarnar, so sæst, at myndin er sera ymisk; í 4. flokki svara 81 %, at tey hava lesiløtu/frílesing í skúlanum eina til tvær ferðir um vikuna ella oftari, talið fyri 6. flokk er 69 %, meðan talið fyri 9. flokk er 22 %. Umleið helvtin hoyrir søgu eina til tvær ferðir um vikuna ella oftari í skúlanum. Hetta talið er meira javnt fyri flokkarnar og hægst í 9. flokki.

### Hvat lesa tey?

Sum heild eru best umtóktu bøkurnar spenningssøgur (52 %), bøkur um søgur frá veruleikanum (45 %) og stuttligar bøkur (44 %), men eisini krimi, fantasy og ævintýr eru vælumtókt. Hyggja vit at kynsbýtinum, so líkist myndin, men gentum dámar betur spenningssøgur, ævintýr, søgur um vinir og søgur um kærleika enn dreingjum. Dreingjum dámar betur faktabøkur (23 % hjá dreingjum og 16 % hjá gentum).

### Á hvørjum máli lesa tey?

Flestu børnini lesa á føroyskum, 66 % siga, at tey lesa ofta ella sera ofta á føroyskum, talið á teimum, sum lesa á donskum, er 31 % fyri somu bólkar, meðan 49 % lesa ofta ella sera ofta á enskum. Dreingir lesa minni enn gentur á føroyskum, men lesa meiri á enskum enn genturnar. Genturnar lesa meiri á donskum enn dreingirnir. Tá ið ræður um flokkarnar, sæst, at tey í 9. flokki lesa nógv meiri á enskum enn hinir árgangirnar, og tað at lesa á føroyskum minkar jú eldri næmingarnir gerast; tað danska er umleið tað sama yvir allar árgangirnar. Tey, sum siga seg lesa nógv í frítíðini, lesa eisini meiri á føroyskum og á donskum, men tey, sum siga seg lesa lítið ella einki, lesa oftari á enskum, enn tey, sum lesa nógv; tølini eru 57 % fyri tey, sum ikki lesa, og 50 % fyri tey, sum lesa.

## Á hvørjum miðli lesa tey?

Her er eingin ivi; børnunum dámar nógv best at lesa á pappíri, tað svara 64 %, og 14 % svara telefonin sum besti miðilin. Bara 5 % svara, at teldilin er best, 8 %, at teldan er best, og 8 %, at teimum dámar best at lurta eftir ljóðbókum o.l. Gentum dámar betur enn dreingir at lesa á pappíri, 73 % móti 55 %. Hinvegin dámar dreingjum betur at lesa á teldu, 15 % móti bara 2 % hjá gentum. Um hesi svar verða sammett við flokkarnar, so er lítil broyting í; tó dámar teimum eldru betur at lesa í telefon samanborið við tey yngstu í fjórða flokki. Tá ið sammett verður við tey, sum siga seg lesa í frítíðini, og tey, sum ikki lesa, so er serliga munur á teimum, sum dámar at lesa í frítíðini, at teimum dámar betur pappír sum miðil, 77 % og 57 %. Hinvegin dámar teimum, sum ikki lesa í frítíðini, betur at lesa á ymsum øðrum miðlum heldur enn pappíri, hóast munurin ikki er so stórur.

## Kyn

Hyggja vit at kynsbýtinum, so lesa fleiri gentur enn dreingir; triðja-fjórða hvør genta og fimti hvør drongur. Hetta er ikki so stórur kynsmunur, sum væntað, tí tað var væntað, at gentur lesa væl meiri og dreingir. Danska kanningin á heysti 2017 vísir, at gentur í Danmark framvegis lesa meiri enn dreingir, men at munurin er minkaður samanborið við eldri kanningar. Í kanningini hava næmingarnir havt høvi at svara ymsum spurningum, sum hava við lesing at gera, og kynsmunir gera seg eisini galdandi, tá ið talan er um skúlating. Tað er vanligari, at foreldur hjálpa gentum við skúlatingum heldur enn dreingjum, og at dreingir brúka meiri tíð á talgildu miðlunum og fleiri ensk orð í samskiftinum við onnur enn gentur. Samanbera vit tølini fyri Føroyar og Danmark í mun til, hvat gentur og dreingir lesa, so sæst, at í Føroyum er nógv størri kynsmunur.

## Tíð

Næmingarnir eru spurdir, hvussu nógva tíð teir brúka til at hyggja í sjónvarp, hyggja at filmi og øðrum, spæla spøl á teldu, telefon, teldli, spælimaskinu, lesa søgur og tekstir á netinum, lesa søgur og tekstir í bókum og bløðum, brúka sosialar miðlar og telefon. Lesingin hevur minst áhuga, sum skilst. Tað, sum børnini fyrst og fremst brúka tíð til, er tað, sum gongur fyri seg á internetinum; eldri næmingarnir verða, meiri tíð brúka teir; 45 % av teimum í 4. flokki brúka fleiri tímar dagliga við telefonini, teldlinum og øðrum líknandi, meðan samsvarandi tal er 91 % fyri tey í 9. flokki. Somuleiðis brúka næmingarnir nógva tíð til at hyggja at filmi á Netflix, Viaplay og líknandi tænastum; ávikavist 49 % í 4. flokki, 72 % í 6. flokki og 91 % í 9. flokki hyggja vanliga hvønn dag. Tey yngstu, sum hava tikið lut í kanningini, brúka ikki nógva tíð til sosialu miðlarnar ein vanligan dag, 14 %, men longu í 6. flokki er nýtslan økt nógv; tá siga 38 % av næmingunum seg vera á sosialu miðlunum, og 72 % av teimum í 9. flokki. At hyggja í sjónvarp í frítíðini er ein farin tíð, tí kanningin staðfestir, at tað eru tað fá børn í øllum trimum árgangum, sum gera.

### Mál

Børnini verða spurd, í hvørjum sambandi tey brúka ensk orð, nær tey tosa enskt, og hvussu ofta. 64 % av næmingunum brúka ensk orð sera ofta, ofta og av og á, tá ið tey eru saman við vinum, 34 % tosa enskt sera ofta, ofta og av og á, tá ið tey eru saman við vinum, og 60 %, tá ið tey mangla ella ikki finna føroyska orðið. Nýtslan av enskum orðum veksur við einum lopi úr 6. upp í 9. flokk, serliga hjá dreingjum, og væl meiri hjá teimum, ið ikki lesa, samanborið við hjá teimum, ið lesa.

### Tey vaksnu – lærarin og foreldrini

Rættiliga nógv børn siga, at foreldrini hava lisið fyri teimum, tá ið tey vóru yngri. Hetta eru serliga næmingar í 9. flokki. Tað kann hugsast, at ein broyting farin fram, tí ikki líka nógv í 4. og 6. flokki siga, at foreldrini hava lisið fyri teimum. Ein orsøk kann vera talgilda menningin, sum hevur tikið dik á seg seinnu árini, og sum tekur tíð frá lesingini, eisini hjá foreldrum, sum tí ikki lesa so nógv fyri børnum sínum. Tað kunnu tó eisini vera aðrar orsøkir, so sum at børn minnast ymiskt alt eftir, hvussu gomul tey eru.

Kanningin av lesivanunum vísir, at lærarin saman við foreldrunum hevur stóran týdning, tá ið talan er um at vísa á, hvar børn og ung kunnu finna bøkur lesa; fleiri vísa á læraran enn á foreldrini; 37 % siga seg lesa, tí lærarin sigur, at tey skulu, meðan 17 % siga, at tey lesa, tí foreldrini siga, at tey skulu. Tey flestu finna tó bøkurnar sjálv uttan hjálp. Lærarin hevur stóra ávirkan á tey fáu, sum siga seg lesa í 9. flokki, tí tey siga, at grundin til, at tey lesa, er, at lærarin sigur, at tey skulu. Sostatt váttar henda nýggja kanningin tað, ið aðrar kanningar siga, nevniliga, at lærarin hevur sera stóran týdning fyri næmingin, bæði tá ið talan er um hugburð, eldhuga og annað. Meðan leikluturin hjá foreldrunum minkar eftir 4. og 6. flokk, tá ið talan er um at halda barnið til bókina, so heldur lærarin fram at hava stóran týdning; hann hevur størri týdning, eldri næmingarnir verða. Serliga fyri dreingirnar hevur lærarin týdning, tí fleiri teirra vísa á, at teir lesa, tí lærarin sigur tað.

Lærarin kann lesa burtur úr hesi kanningini av lesivanunum hjá føroyskum børnum í dagsins samfelag, at tað er ikki til fánýtis at varpa ljós á týdningin at lesa, tí børnini vísa á, at tað er lærarin saman við foreldrunum, sum er orsøkin til, at tey lesa, lærarin meiri enn foreldrini. Lærarin má gera sær greitt, at hann hevur møguleika at venda gongdini hjá nógvum børnum. Hann hevur saman við foreldrunum sera stóra ávirkan á, um næmingurin mennir seg í lesing og fær góðar málførleikar.

## Víðari greining

Fyri at fáa meiri vitan til vega burtur úr úrslitunum er ein víðari greining gjørd av úrslitinum. Hendan greining tekur støði í heilum flokkum og ikki næmingunum einsæris, soleiðis at minsta eindin nú er ein skúlaflokkur. Fyrimunurin við hesum er, at nú verður fokus á karmarnar rundan um einstaka flokkin og ikki einstaka næmingin, har ymiskleikin kann verða sera stórur. Nú ber til at síggja, hvussu karmarnir og dynamikkurin ávirka einstaka flokkin. Endamálið við greiningini er

síggja flokkarnar út frá tveimum dimensiónum, sum eru: hvussu ofta børn lesa, tað vil siga *lesitíttleikin,* og *hugburðurin* til at lesa.

**Greiningin tekur støði í teimum báðum spurningunum:**

nr. 16 HVUSSU OFTA LESUR TÚ BØKUR Í FRÍTÍÐINI (IKKI SKÚLATING)?

nr. 18 HVØRJI AV HESUM ERT TÚ SAMD/UR VIÐ, TÁ TÚ HUGSAR UM LESING?

Síðan hyggja vit at teimum 10 flokkunum, sum liggja ávikavist í toppinum ella botninum í mun til lesitíttleika og hugburð til lesing, og um nakar variabul kann skilja ímillum hesar bólkar.

Endamálið við hesi greiningini er at staðfesta og greiða frá, hví munur er á ymsu flokkunum – við støði í hesum báðum dimensiónum:

- Lesitíttleiki
    - Hvussu stórur partur av næmingunum í flokkinum lesa bøkur í frítíðini fleiri ferðir um vikuna
- Hugburður til at lesa - parturin av næmingunum, ið eru samdir í hesum útsagnum:
    - *Mær dámar at lesa*
    - *Eg haldi, at tað er kul at lesa*
    - *Eg læri nógv av at lesa*


70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
0%
10%
20%
30%
40%
50%
60%
70%
80%
Lesitíttleiki
Hugburður
4.fl.
6.fl.
9.fl.




Í greiningini hava vit valt at taka 9. flokk burturúr, tí teir víkja frá hinum flokkunum í atferð og lesimynstri (teir hava mest sum allir lægri lesitíttleika og heldur neiligan hugburð til lesing). Tískil eru hesi úrslit galdandi fyri 4. og 6. flokkar. Vit hyggja at samanhangum og hvørja signifikanta ávirkan ymsu variablarnir hava á sannlíkindini fyri, um flokkurin er í toppi ella botni.




Hyggja vit at variablinum kyn, so eru fleiri gentur í flokkunum, sum liggja topp 10 enn botn 10.




Hyggja vit at variablinum hvørji mál, tað vil siga, hvørji mál verða tosað heima, so hava flokkarnir í topp 10 fleiri børn, sum bara tosa føroyskt heima.




Í mun til, hvussu nógvar bøkur eru í heiminum, so er hetta ein signifikantur variabul fyri, um flokkarnir eru í toppi ella botni.




Hyggja vit at, hvussu ofta børn ganga til ymisk frítíðarítriv, so sæst eisini munur á flokkunum her.




Flokkarnir í topp 10 hava fleiri børn, sum eru samd við útsøgnum so sum *mær dámar væl at vera í skúla* og *eg trívist har*.




Tað eru líka nógv børn í toppi og botni, sum altíð gera skúlating, men fleiri sum sjáldan og ongantíð gera skúlating í flokkunum í botninum.




Tað eru fleiri mammur og systkin, sum hjálpa teimum í topp 10, men oftari onkur annar í botn 10.




50 % av teimum í botn 10 brúka ein tíma ella meira til at spæla spøl á teldu, telefon o.s.fr., í mun til 38 % í topp 10.




22 % av teimum í botn 10 flokkunum brúka ofta ensk orð, tí tey mangla ella ikki kenna føroyska orðið, meðan hetta talið er 11 fyri tey í topp 10 %.




Tað eru fleiri, sum lesa hart í flokkinum í botn 10 flokkunum.




Millum topp 10 flokkarnar eru tað 28 % av børnunum, sum læna bøkur á bókasavninum næstan hvønn dag ella fleiri ferðir um vikuna í mun til 9 % í botn 10.




Millum topp 10 flokkarnar eru tað 21 % av børnunum, sum læna bøkur á bókasavninum heim við næstan hvønn dag ella fleiri ferðir um vikuna í mun til 5 % í botn 10.




Tað eru fleiri børn, sum lesa á føroyskum í frítíðini (alt telur við) í topp 10 enn í botn 10.




Tað eru fleiri børn, sum fáa hjálp frá foreldrum til at finna bøkur at lesa í topp 10, enn í botn 10.




Í mun til at geva boð uppá, hvat kundi fingið tey at lisið meiri, “eg hevði lisið meira...?” so eru tað fleiri, sum svara *um eg dugdi betur at lesa* í botn 10.




82 % av børnunum í flokkunum, sum liggja í topp 10, svara, at onkur las fyri teimum, áðrenn tey fóru í skúla nakrar ferðir um vikuna ella hvønn/næstan hvønn dag, meðan talið fyri botn 10 er 73 %.




Tað er bara eitt evni, sum børnini í botn 10 flokkunum dámar betur at lesa um, og tað er søgur um vinir.




Nakað fleiri av børnunum í botn 10 dámar at lesa á teldli, telefon og at lurta eftir ljóðbókum, meðan talið fyri teldu er nakað tað sama; á pappíri hevur yvirvág í topp 10 flokkunum.

## Samanumtøka av víðari greining

Hesin parturin av greiningini í lesikanningini avdúkar, at flokkarnar í topp 10 í mun til hugburð og lesitíttleika og botn 10 svara ymiskt uppá eina røð av spurningum. Vit hava heilar skúlaflokkar, har flestu næmingarnir halda, at tað er kul at lesa, at tað er stuttligt og læruríkt at lesa, og har nógv verður lisið. Um somu tíð hava vit heilar flokkar, sum siga tað øvuta, at tað er keðiligt at lesa, at tey orka ikki fyri at lesa, og har einki verður lisið. Talan er ikki um nakrar fáar flokkar, men nógvar, har næmingarnir hava neiligan hugburð til tað at lesa og tí einki lesa. Við øðrum orðum eru tey, sum ikki orka fyri at lesa, savnað ávís støð ella í ávísum flokkum og skúlum.

Vit síggja hesi eyðkenni fyri teir flokkarnir, sum liggja í topp 10 í mun til lesitíttleika og jaligan hugburð:

- Hava størri part av gentum í flokkinum
- fleiri tosa bara føroyskt heima
- tey eiga fleiri bøkur
- børnini fáa meiri hjálp til skúlating
- tey brúka minni tíð til teldu, teldil ella spælimaskinu

- tey brúka ikki líka ofta ensk orð, tí tey ikki kenna føroyska orðið
- tey lesa meira á føroyskum
- tey læna oftari bøkur

## Høvuðsúrslit í kanningini

- Tveir triðingar av børnunum ella 65,6 % av øllum børnunum í øllum trimum árgangunum í 4., 6. og 9. flokki lesa sjáldan ella ongantíð.
- Samanbering millum tey, sum siga seg lesa hvønn dag og tey, sum ikki lesa, vísir týðiliga, at tey, sum ikki lesa, nýta talgildu miðlarnar nógv meiri enn tey, sum lesa.
- 28 % brúka ofta ella sera ofta ensk orð, tá ið tey mangla ella ikki kenna føroyska orðið. Um hugt verður at ensku málnýtsluni og lesing, sæst, at tey børnini, sum lesa nógv, ikki brúka ensku orðini líka nógv, sum tey, sum ikki lesa. Av teimum, sum lesa nógv, siga 19 % seg brúka ensk orð, tá ið tey ikki kenna føroyska orðið, meðan talið hjá teimum, sum ikki lesa er 32 %.
- Stórur munur er á, hvussu nógv børnini læna bøkur á bókasavninum alt eftir hvørjum flokki tey ganga í. Tá ið hugt verður at flokkunum, sæst, at tey í 4. og 6. læna nokkso nógv, meðan tey í 9. flokki læna nógv minni. Í teimum báðum yngru flokkunum liggur talið um 50 %, meðan tað í 9. er bara 9 %. Um bókasavnsvitjanirnar verða samanbornar við, hvussu ofta tey lesa, sæst – og tað er eisini væntandi – at tey, sum lesa nógv, eru títtari gestir á bókasøvnunum, munurin er 55 % og 25 %.
- Næmingar siga, at tey høvdu lisið meiri um bøkur vóru um evni, sum hava teirra áhuga (her var møguleiki at seta fleiri krossar). 60% hava sett kross við henda møguleikan. 47% siga, at um tey vistu onkra góða bók, so høvdu tey lisið meiri. 13 % høvdu lisið meiri um tey dugdu betur at lesa.
- Tá ið borið verður saman við Danmark, sæst, at føroyskir næmingar lesa munandi minni enn teir donsku næmingarnir, í summum førum ikki meiri enn eina góða helvt av tí, sum tey lesa í Danmark.
- Tá ið spurningurin um hugburð til lesing verður settur saman við flokki, kyni og hvussu ofta tey lesa, sæst millum annað, at gentur hava ein meiri jaligan hugburð til lesing, og at tær eisini oftari halda seg fáa nakað burtur úr lesingini.
- Dreingir lesa minni enn gentur á føroyskum, men lesa meiri á enskum enn genturnar, sama er við øðrum málum. Genturnar lesa meiri á donskum enn dreingirnir. Tá ið ræður um flokkarnar, sæst, at tey í 9. flokki lesa nógv meiri á enskum enn hinir árgangirnar. Tað at lesa á føroyskum minkar jú eldri næmingarnir gerast. Tey, sum siga seg lesa nógv í frítíðini, lesa eisini meiri á føroyskum, men tey, sum siga seg lesa lítið ella einki, lesa eitt sindur oftari á enskum enn tey, sum lesa nógv; tølini eru 57 % fyri tey, sum ikki lesa, og 50 % fyri tey, sum lesa.

- Tá ið tølini verða samanborin fyri tey, sum siga seg lesa nógv í frítiðini, og tey, sum ikki lesa, sæst, at hjá teimum, sum lesa nógv í frítiðini, so lesa foreldrini eisini, 76 % svara, at foreldrini lesa heima. Hjá teimum, sum ikki lesa, er hetta talið 57 %.
- Tá ið vit hyggja at flokkum, so er kyn ein variabul, sum hevur ávirkan um flokkurin endar í topp 10 ella botn 10. Í mun til mál, so er tað eisini soleiðis, at har, sum tað eru flest, sum tosa føroyskt í flokkinum, so er flokkurin millum topp 10. Millum topp 10 flokkarnar eru tað 21 % av børnunum, sum læna bøkur á bókasavninum heim við næstan hvønn dag ella fleiri ferðir um vikuna í mun til 5 % í botn 10.

## Hjáveiða

Onnur áhugaverd úrslit eru eisini enn tey, sum verða tikin fram í hesi frágreiðingini, og nógv positivt er at finna millum úrslitini. 9 út av 10 siga seg vera saman við vinum hvønn dag ella fleiri ferðir um vikuna, knapt 80 % íðka ítrótt hvønn dag ella nakrar ferðir um vikuna, 80 til 85 % siga, at tey læra nakað, at tey trívast væl og hava vinir í skúlanum, og 89 %, at tey altíð ella næstan altíð gera skúlating.

Onnur úrslit:

- Um hugt verður at gentum og dreingjum, so eru nógv fleiri gentur, 75 %, enn dreingir, 55 %, sum siga seg dáma væl at ganga í skúla. Eisini sæst, at 92 % av gentunum halda, at lærararnir eru fittir móti sær, meðan talið hjá dreingjunum er bara 78 % . Tað sæst týðiliga, at tey, sum siga seg hava góðan hug at ganga í skúla, eisini eru tey, sum lesa mest í frítíðini, tølini eru ávikavist 74 % og 59 %.
- Hyggja vit at kynunum sæst, at færri dreingir enn gentur fáa hjálp til skúlating.
- Her sæst, at tað, sum vit hugsa sum vanligu miðlarnar, stendur veikt; nógv siga seg ongantíð hvørki hyggja í sjónvarp ella lesa bløð og bøkur.
- Her er eingin ivi, børnunum dámar nógv best at lesa á pappíri, tað svara 64 %, og 14 % svara telefonin sum besti miðilin.
- Tey, sum eiga bøkur heima, lesa oftari fleiri ferðir um vikuna, enn tey, sum eiga fáar bøkur.
- Um hugt verður at kyninum í mun til, hvussu tey finna bøkur, sæst lítil munur. Størsti munurin er, at gentur í nógv størri mun fáa íblástur frá vinfólkum. Í 4. og 6. flokki finna tey oftari bøkurnar sjálv, men at eisini lærararnir og foreldrini eiga størri leiklut í 4. og 6. flokki heldur enn í 9. flokki. Í 9. flokki brúka tey eisini munandi meiri á netinum at leita sær eftir bókum enn hinir árgangirnir.
- Um hugt verður at svarunum, hvat kundi gjørt, at børnini lósu meira, í mun til tey, sum siga seg lesa ella ikki lesa, sæst, at tey, sum lesa nógv, høvdu lisið meira, um tað vóru fleiri bøkur á føroyskum, og um tey høvdu betri tíð. Hinvegin høvdu tey, sum ikki siga seg lesa (48 %), lisið meira, um tey vistu um góðar bøkur, og 16 % av teimum, sum ikki siga seg lesa, høvdu lisið meira, um tey dugdu betur at lesa.

- Dreingir halda seg duga betur at rokna enn gentur halda seg duga at rokna, og við lesingini er tað øvut, at fleiri gentur halda seg duga at væl at lesa enn dreingir halda seg duga at lesa. Men munurin er lítil. Fleiri dreingir halda, at lesing er torførari lærugrein enn aðrar.
- Tá ið hugt verður at hesum tølunum og hvørjum flokkum tey ganga í, sæst, at tey í teimum yngru flokkunum oftari hava lesiløtu, í 4. flokki eru tey 81 %, meðan tey í 9. flokki bara eru 22 %. Hinvegin tosa tey í teimum eldru flokkunum meiri um tað, sum tey lesa, 77 % í 9. flokki, meðan tað bara eru 42 % í 4. flokki.
- Um hugt verður at frítíðarítrivunum og huginum at lesa, so sæst, at tey, sum ganga til tónleik, og tey, sum ganga til onnur ítriv, siga seg lesa munandi meiri enn tey, sum ikki ganga til hesi ítriv. Hinvegin sæst, at tað at ganga til ítrótt onga ávirkan hevur á lesihugin.
- Um tølini verða samanborin fyri tey, sum siga seg lesa nógv, og tey, sum einki lesa, sæst, at tey, sum lesa nógv, eisini nógv oftari siga seg duga væl at lesa og rokna. Tá ið svarini verða samanborin við tey, sum lesa nógv, og við tey, sum ikki lesa, so sæst, at tey, sum siga seg lesa nógv, eisini í størri mun halda seg duga betur at lesa enn hini í flokkinum.

## Samanumtøka og tilráðing

Spyrt tú lærarar, sum undirvísa í føroyskum, so siga nógvir teirra, at børn í teimum yngstu flokkunum lesa meiri nú, enn børn gjørdu fyri nøkrum árum síðan. Í kanningini sæst, at gott helvtin av børnunum hava lesiløtu/frílesing í skúlanum eina til tvær ferðir um vikuna ella meira. Hyggja vit at hesum í mun til flokkarnar, so sæst, at myndin er sera ymisk, og at lærararnir hava rætt í, at tað verður lisið javnan í 4. flokki. Har svara 81 %, at tey hava lesiløtu/frílesing í skúlanum eina til tvær ferðir um vikuna ella meira, talið fyri 6. flokk er 69 %, meðan fyri 9. flokk er talið 22 %. Spyrja vit inn til lesing í frítíðini, vísir kanningin, at ein fjórðingur av børnunum lesa millum nakrar ferðir um vikuna til næstan hvønn dag, meðan 64 % lesa sjáldan ella ongatíð í frítíðini. Vit hoyra javnan lærarar siga, at børn í eldru flokkunum lesa lítið og einki; kanningin staðfestir, at hesir lærararnir hava rætt; fallið í lesingini í bæði frítíðini og í skúlanum er ógvuliga stórt frá 6. flokki til 9. flokk.

At bara umleið triðja hvørt barn í 4. flokki og 6. flokki lesur regluliga í frítíðini, tað er fleiri ferðir um vikuna, er órógvandi. Børnum í hesum aldrinum tørvar nógva lesivenjing fyri at ogna sær góðan og nøktandi lesiførleika og gott orðfeingi. Tey børnini, sum ikki lesa regluliga og støðugt, hava ikki sama møguleika at mennast málsliga í sama mun sum tey, sum lesa; góður lesiførleiki er, at tú lesur flótandi og raðið uttan at brúka orku at avkoda orðini, og at tú skilir tað, tú lesur. Gott orðfeingi stuðlar undir bæði avkoding og lesifatan. Tá ið so stórt tal sum 67 % av teimum í 4. flokki, ella tveir triðingar, ikki lesa, so bendir tað á, at venjingin ikki er nóg støðug og munagóð. Tað er ein sannroynd, at meiri tú lesur, meiri venur tú avkodan og skjótleika, og skjótari lesur tú raðið og skilir tað, tú lesur. Lesur tú ikki raðið, so stríðist heilin við at avkoda tað, tú lesur, og fatanarmongdin fellur; við øðrum orðum fært tú ikki tað burtur úr tekstinum, sum tú eigur. Hjá alt ov mongum børnum í okkara skúlaverki verður lesiførleikin ikki nóg góður, tá ið vit kunnu

staðfesta, at tey lesa ov lítið. Kanningin *Lesivanar hjá føroyskum børnum og ungum frá 2006* var gjørd á annan hátt enn kanningin í 2017/2018 og er tí ikki heilt sambærilig; 788 børn í 4.-10. flokk (15 % av árgangunum, sum tóku lut) svaraðu spurnablaði um, hvussu ofta tey lósu, hvussu nógv og hvørjar bøkur tey lósu. Men kanningin frá 2006 vísti eisini tá, at børn í Føroyum lósu minni enn javnaldrarnir í Norðurlondum, helvtina minni enn børn í Danmark.

Um vit samanbera tølini frá føroysku kanningini við kanningina, sum var gjørd á heysti 2017 í Danmark, so sæst, at børn í Føroyum lesa nógv minni samanborið við javnaldrarnar í Danmark, hóast børn í Danmark hava væl longri skúladag, mangastaðni væl longri leið í skúla og brúka líka nógva tíð til talgildu miðlarnar sum føroysk børn. 62 % av børnunum í 4. flokki og 42 % av børnunum í 6. flokki í Danmark lesa fleiri ferðir um vikuna; tað er í roynd og veru tvífalt so nógv sum í Føroyum.

Hví er úrslitið, sum tað er? Tað er torført at svara hesum spurningi, men vit fara at geva nøkur boð. Gerandisdagurin og miðlanýtslan hjá børnum er nógv broytt seinnu árini. Serliga er tað høgliga atgongdin til internetið og ein nýggjan talgildan veruleika, sum hevur broytt mentan og nýtslu. Hendan broytingin kann eisini hava broytt ella ávirkað lesingina hjá børnunum, kanska serliga lesingina í frítíðini. Vantandi orðfeingi á føroyskum kann vera atvoldin til, at annaðhvørt barn, sum tekur lut í kanningini, brúkar ensk orð í staðin fyri føroysk í samskifti við onnur; hetta er vanligari, eldri børnini gerast, og eisini vanligari, um tú ert drongur. Vantandi orðfeingi á føroyskum kann vera ein avleiðing av vantandi lesing, og tí børnini í so lítlan mun møta føroyskum orðum. Tey møta teimum ensku orðunum oftari og í fleiri samanhangum á talgildu miðlunum, og tí stendur tað enska málið fremri í huganum og minninum hjá nógvum børnum enn tað føroyska. Ensku orðini eta seg inn í føroyska málið; enskt verður tí ikki eitt mál, sum tey fáa afturat, men gerst partur av neyðuga orðfeinginum, fyri at børnini yvirhøvur megna at bera tað fram, sum tey vilja siga. So kundi hugsast, at hugurin til at lesa gjørdist størri, um tey brúktu á talgildu miðlarnar, men tað eru færri, sum siga seg lesa tekstir á internetinum, enn í bókum og bløðum, og tey eru ivaleys í, at tey heldur vilja lesa í pappírsformi enn t.d. á teldlum.

Í mun til greiningina av flokkum og hægri lesitíttleika/jaligari hugburð og hvørji viðurskifti gera seg galdandi í flokkunum, ið ikki orka fyri at lesa, samanborið við í flokkunum, sum dámar sera væl at lesa, eiga vit at kanna nærri, hvat tað er, sum ger, at heilir flokkar av næmingum hava slíkan hugburð; vit kunnu hóskandi spyrja, hvat verður gjørt á staðnum at stimbra lesihugin, hvussu nógv verður gjørt við at vísa á týdningin av at lesa, og hvussu tað verður virðismett, at tað verður lisið. Tað er í grundini undranarvert, tá ið hugsað verður um, at flestu lærarar í Føroyum koma av sama lærustovni, at teir hava somu námsætlanir at halda seg til, sama undirvísingartilfar, somu karmar, og at samfelagið, hóast tað er í broyting, er rættiliga einsháttað, tá ið hugsað verður um fólkasamanseting. Orsøkin kann m.a. liggja í floksdynamikkinum, sum ger, at næmingar í einum flokki fáa líknandi atburð og vanar, og at tað er ymisk mentan, ið ger seg galdandi í flokkum, skúlum ella á ávísum støðum. Vit koma ikki uttanum, at kósin í teimum flokkum, har tað er ráðandi, at tað ikki hevur so stóran týdning at duga at lesa, er ikki góð, tí hetta eru heilir flokkar

talan er um; børnini, ið vaksa upp í slíkum umhvørvi, hava verri fortreytir enn javnaldrarnir aðrastaðni at klára seg væl seinni í skúlaskipanini og í lívinum.

Tað er ikki nýtt, at tey, ið lesa, gerast færri í tali; talið á teimum í 9. flokki, ið ikki lesa, kundi bent á, at hetta er ein gongd, ið er byrjað fyri eini tíð síðan. Avleiðingin av, at so stórur partur av børnunum ikki lesur støðugt, kann vera, at hesi fáa nógv størri avbjóðingar at klára seg væl í skúlanum og seinni í lívinum. Seta vit sjóneykuna á miðnám, har tey flestu ungu fara, so hoyra vit nógvar lærarar har siga, at tey ungu nú á døgum einki lesa, og at soleiðis hevur verið leingi. Tey, ið gevast í miðnámi, eru rættiliga nógv í tali, meiri enn tvífalt so nógv, sum fráfallið er í Danmark. Flyta vit hetta yvir á hægri lærustovnar, so síggja vit eisini, at fráfallið er nógvar ferðir størri í Føroyum samanborið við í Danmark. Kann ein av fleiri orsøkum til stóra fráfallið í miðnámi og á hægri lærustovnum vera vantandi lesivanar?

Tilvitið og hugburðurin um týdningin, lærarin og námsfrøðingurin hava á menningina hjá næmingum, hava ógvuliga nógv at siga. Samanhangurin millum at lesa og at duga at málbera seg neyvt og gjølla og skriva abstraktan tekst má vera týðiligur í læraraútbúgvingini og eftirútbúgvingarhøpi. Tað hevur ógvuliga stóran týdning, at skúlin allan vegin í skúlaskipanini ger næmingarnar varugar við týdningin, sum lesing hevur fyri orðfeingi, málførleika og skriviførleika. Tað er í bókum, tú finnur eitt kompleksari mál á skrift, tí í bókum er málið umhugsað. Fyri at kunna vísa næminginum á henda týdningin, er tað ein fortreyt, at lærarin onkursvegna vísir vegin og er ein fyrimynd. At hann veit um bøkur og tilfar, sum kunnu fanga næmingin, og at hann megnar at finna eina bók til næmingin, sum hóskar til hansara. Tað treytar sjálvandi, at lærarin veit hvørjar bøkur koma út, kunnar seg um tær og stuðlar næmingunum í lesingini í breiðastu merking. Tað snýr seg um at geva barninum framtíðarmøguleikar, og at lærarar eru kveikjarar og berarar av mentan og vitan og tilvitaðir um tann stóra týdning, teir hava. Men menningin byrjar langt áðrenn barnið fer í skúla, og tí er tað eisini av stórum týdningi, at tilvit og vitan um máltøku og málsliga menning er týðandi partur í bæði námsfrøðiligu útbúgvingini og eftirútbúgving.

Vit mæla til, at kanningin av lesivanunum og frágreiðingin, sum er skrivað um hana, hava við sær, at átøk verða sett í verk; áðrenn átøk verða sett í verk, eigur ein kvalitativ kanning at verða gjørd; henda kanningin kann stuðla, dýpa og fara aftur um tað, sum er komið fram í kvantitativu kanningini. Meiri vitan gevur eitt betri grundarlag at taka umhugsaðar avgerðir. Vónin er eisini, at myndugleikarnir fara at gera líknandi kanningar aftur komandi árini, tí so ber til at siga, um átøkini, sum avvarðandi myndugleikar vónandi skipa fyri, veruliga muna. Vónandi kunnu politikarar, lærarar, foreldur og onnur nýta hetta í kjakinum, og okkara vón er, at tað eisini endar við, at átøk verða sett í verk til frama fyri lesigleði og førleikar hjá okkara børnum.

# Leinkjur

http://www.fremtidensbiblioteker.dk/uploads/website/pdfer-lselyst/Overblikogindblik2017.pdf

http://www.fremtidensbiblioteker.dk/uploads/website/pdfer-lselyst/kvantitativrapport20171.pdf

http://lesesenteret.uis.no/forskning/leseundersoekelser/pirls/2016/

# Fylgiskjal

## Spurnablaðið

**UM TEG**

### 1. ERT TÚ GENTA ELLA DRONGUR?

- ○ Genta
- ○ Drongur

### 2. HVØRJI MÁL TOSA TIT HEIMA?

- ○ Føroyskt
- ○ Føroyskt og onnur mál
- ○ Mest onnur mál

### 3. HVUSSU NÓGVAR BØKUR EIGA TIT HEIMA?

- ○ Ongar ella fáar (0-10 bøkur)
- ○ Eina hill (11-25 bøkur)
- ○ Ein vegg við hillum (26-100 bøkur)
- ○ Fleiri veggir við hillum (101-200 bøkur)
- ○ Nógvar bøkur (fleiri enn 200)
- ○ Veit ikki

## 4. HVUSSU OFTA GERT TÚ HETTA Í FRÍTÍÐINI?

| *Set ein kross fyri hvørja reglu* | Hvønn dag ellan næstan hvønn dag | Nakrar ferðir um vikuna | Nakrar ferðir um mánaðin | Nakrar ferðir um árið | Ongantíð ella næstan ongantíð | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Íðkar ítrótt (td. fótbólt, hondbólt, badminton og annað)** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Gongur til tónleikaundirvísing** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Gongur til onnur frítíðarítriv (td. skótar og annað)** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Ert saman við vinum** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |

## 5. HVUSSU SAMD/UR ER TÚ VIÐ HESUM ÚTSAGNUM?

| *Set ein kross fyri hvørja reglu* | Púra samd/ur | Samd/ur | Hvørki | Ósamd/ ur | Púra ósamd/ ur | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Mær dámar væl at vera í skúla** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Eg læri nógv í skúlanum** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Eg trívist væl í skúlanum** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Eg havi nógvar vinir í skúlanum** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Lærararnir eru fittir móti mær** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |

## 6. HVUSSU OFTA GERT TÚ SKÚLATING?

- ○ **Altíð**
- ○ **Næstan altíð**
- ○ **Av og á**
- ○ **Sjáldan**
- ○ **Ongantíð**
- ○ **Veit ikki**

## 7. Hvør hjálpir tær við skúlatingum?

*Tú kanst seta fleiri krossar*

- ☐ Mamma
- ☐ Pápi
- ☐ Systkin
- ☐ Onkur annar
- ☐ Lektiuhjálp/lektiucafé
- ☐ Eingin

## 8. HVUSSU NÓGVA TÍÐ BRÚKAR TÚ TIL HETTA EIN VANLIGAN DAG?

| *Set ein kross fyri hvørja reglu* | meiri enn 5 tímar | 4-5 tímar | 1-3 tímar | upp til 1 tíma | onga tíð | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eg hyggi í sjónvarp | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| Eg hyggi at filmi og øðrum (YouTube, Netflix, Viaplay og annað) | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| Eg spæli spøl á teldu, telefon/tablet, spælimaskinu (t..d Fifa, Sims, Minecraft, Hay Day og annað) | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| Eg lesi søgur og tekstir á internetinum (t.d. blog-gar, e-bøkur) | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| Eg lesi søgur og tekstir í bókum og bløðum | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| Eg brúki sosialar miðlar (t.d. Facebook, Twitter, Instagram, Snapchat) | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| Eg brúki telefon/tablet ella teldu | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |

## 9. ERT TÚ LIMUR Í BARNABÓKAKLUBBANUM?

- ○ Ja
- ○ Nei, men eg havi verið
- ○ Nei

○ Eg veit ikki, hvat Barnabókaklubbin er

## 10. HVUSSU OFTA...?

| *Set ein kross fyri hvørja reglu* | Sera ofta | Ofta | Av og á | Sjáldan | Ongantíð | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Brúkar tú ensk orð, tá tú ert saman við vinum** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Brúkar tú ensk orð ella tosar enskt, tá spælir teldu ella tablet** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Tosar tú enskt, tá tú ert saman við tínum vinum** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Brúkar tú ensk orð, tá tú manglar ella ikki kennir tað føroyska orðið** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |

# UM TEG OG LESING Í SKÚLANUM

## 11. HVUSSU OFTA GERA TIT HETTA Í SKÚLANUM?

| *Set ein kross fyri hvørja reglu* | Hvønn dag ellan næstan hvønn dag | Eina ella tvær ferðir um vikuna | Eina ella tvær ferðir um mánaðin | Nakrar ferðir um árið | Ongantíð ella næstan ongantíð | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hava lesiløtu/frílesing** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Lesa hart í flokkinum** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Lurta eftir søgu** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Vit tosa í flokkinum um tað, sum vit hava lisið** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |

## 12. HVUSSU OFTA LÆNIR TÚ BØKUR Á BÓKASAVNINUM (Í SKÚLANUM)?

○ Næstan hvønn dag

- Fleiri ferðir um vikuna
- Fleiri ferðir um mánaðin
- Sjáldan
- Ongantíð

## 13. HVUSSU SAMD/UR ER TÚ VIÐ HESUM ÚTSAGNUM?

| *Set ein kross fyri hvørja reglu* | Púra samd/ur | Samd/ur | Hvørki | Ósamd/ ur | Púra ósamd/ ur | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eg dugi væl at rokna | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| Eg dugi væl at lesa | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| Lesing er truplari enn onnur fak | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |

## 14. DUGIR TÚ LÍKA VÆL AT LESA SUM HINI Í FLOKKINUM?

- 1. Eg dugi betur enn hini
- 2. Eg dugi eitt sindur betur enn hini
- 3. Eg dugi líka væl sum hini
- 4. Eg dugi eitt sindur verri enn hini
- 5. Eg dugi verri enn hini
- Veit ikki

# UM TEG OG LESING Í FRÍTÍÐINI

## 15. HVUSSU OFTA LÆNIR TÚ BØKUR Á BÓKASAVNINUM AT HAVA HEIM VIÐ AT LESA?

- Næstan hvønn dag
- Fleiri ferðir um vikuna
- Fleiri ferðir um mánaðin
- Sjáldan
- Ongantíð

## 16. HVUSSU OFTA LESUR TÚ BØKUR Í FRÍTÍÐINI (IKKI SKÚLATING)?

- Næstan hvønn dag
- Fleiri ferðir um vikuna
- Fleiri ferðir um mánaðin
- Sjáldan
- Ongantíð

## 17. HVUSSU LEINGI LESUR TÚ ANNAÐ ENN BØKUR Í FRÍTÍÐINI? (ALT TELUR VIÐ, T.D. FACEBOOK, BLØÐ, HEIMASÍÐUR, MESSENGER, SMS)?

- Meiri enn hálvan tíma um dagin
- Hálvan tíma um dagin
- Minni enn hálvan tíma um dagin
- Nakrar ferðir um vikuna
- Nakrar ferðir um mánaðin
- Aldrin

## 18. HVØRJI AV HESUM ERT TÚ SAMD/UR VIÐ, TÁ TÚ HUGSAR UM LESING?

*TÚ KANST SET KROSSAR Í FLEIRI KASSAR*

- ☐ **Mær dámar at lesa**
- ☐ **Eg haldi, at tað er kul at lesa**
- ☐ **Eg haldi, at tað er keðiligt at lesa**
- ☐ **Eg læri nógv av at lesa**
- ☐ **Eg lesi bara tað, eg eri noydd/ur at lesa**
- ☐ **Eg lesi, tí tey mamma ella pápi siga, at eg skal**
- ☐ **Eg lesi, tí lærarin sigur tað**
- ☐ **Eg hati at lesa**

## 19. Á HVØRJUM MÁLI LESUR TÚ Í FRÍTÍÐINI? (ALT TELUR VIÐ, T.D. FACEBOOK, BØKUR, BLØÐ, HEIMASÍÐUR, MESSENGER, SMS)?

| *Set ein kross fyri hvørja reglu* | Sera ofta | Ofta | Av og á | Sjáldan | Ongantíð | Veit ikki |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Á føroyskum** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Á donskum** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Á enskum** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |
| **Á øðrum máli** | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ | ○ |

## 20. HVØR HJÁLPIR TÆR AT FINNA TÆR BØKUR TÚ LESUR Í FRÍTÍÐINI?

*TÚ KANST SET KROSSAR Í FLEIRI KASSAR*

- ☐ **Eg finni tær sjálv/ur**
- ☐ **Lærarin**
- ☐ **Bókavørðurin**
- ☐ **Mamma ella pápi**
- ☐ **Vinir**
- ☐ **Eg leiti á netinum**

- ☐ Onnur
- ☐ Eg lesi ongar/næstan ongar bøkur í frítíðini

## 21. EG HEVÐI LISIÐ MEIRI...?

*TÚ KANST SET KROSSAR Í FLEIRI KASSAR*

- ☐ Um tað vóru fleiri bøkur á føroyskum
- ☐ Um tað vóru fleiri bøkur um evni, sum hava mín áhuga
- ☐ Um mínir vinir lósu meiri
- ☐ Um onkur las hart fyri mær
- ☐ Um eg dugdi betur at lesa
- ☐ Um eg hevði meiri tíð
- ☐ Um eg visti onkra góða bók
- ☐ Um onkur heima hjálpti mær at finna bøkur
- ☐ Um onkur í skúlanum hjálpti mær at finna bøkur

## 22. LAS NAKAR FYRI TÆR, ÁÐRENN TÚ BYRJAÐI AT GANGA Í SKÚLA (TVS. TÁ TÚ VART YNGRI ENN 7 ÁR)?

- ○ Hvønn dag ella næstan hvønn dag
- ○ Nakrar ferðir um vikuna
- ○ Nakrar ferðir um mánaðin
- ○ Sjáldan
- ○ Ongantíð

## 23. HVUSSU OFTA LESA TÍNI FORELDUR BØKUR?

- ○ Ofta
- ○ Av og á
- ○ Sjáldan

- Ongantíð
- Veit ikki

## 24. HVØRJAR BØKUR DÁMAR TÆR AT LESA?

*TÚ KANST SET KROSSAR Í FLEIRI KASSAR*

- Søgur frá veruleikanum
- Søgur um kærleika
- Søgur um vinir
- Fantasy
- Spenningssøgur
- Faktabøkur
- Krimi
- Ræðusøgur
- Stuttligar bøkur
- Myndabøkur
- Teknisøgur
- Ævintýr
- Krabbabøkur

## 25. TÁ IÐ TÚ LESUR, HVUSSU DÁMAR TÆR SO BEST AT LESA?

- Á pappíri
- Á teldu
- Á teldli/tablet
- Á telefon
- At lurta (ljóðbók, podcast o.s.fr.)

## 26. HVAT LESUR TÚ Á NETINUM (Á TELEFON, TELDLI/TABLET ELLA TELDU)?

*TÚ KANST SET KROSSAR Í FLEIRI KASSAR*

- ☐ **Tíðindi**
- ☐ **Ítróttatíðindi**
- ☐ **Um kend fólk, filmar, tónleik, djór**
- ☐ **Heimasíður**
- ☐ **Undirtekstir í filmum**
- ☐ **Annað**
- ☐ **Lesi einki**